| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>23. mai 2017 | Blað nr.: 1<br>Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 23. mai 2017 **Kl**. 18:00
**Stað**: Býráðssalurin
**Málsnr:**

**FUNDARLEIÐARI:**
Annika Olsen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Helena Dam á Neystabø
Tróndur Sigurðsson
Halla Samuelsen
Bogi Andreasen
Annfinn Brekkstein
Jákup Dam
Marin Katrina Frýdal
Bjørghild Djurhuus
Gunvør Balle
Turið Horn
Bergun Kass
Heðin Mortensen

**LUTTÓKU EISINI:**
Ingunn Eiriksdóttir
Jóan Petur Hentze
Mikael H. Viderø
Anna Havmand
Olga Knudsen
Andrass Thomsen
Helena H. Johannesen

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**


| | | | |
|---|---|---|---|
| 135/17 | 17/00041-1 | Mál beind í nevndir 2017 | 3 |
| 136/17 | 17/01434-1 | Útleigan av Sjóvinnuhúsinum til Fróðskaparsetrið | 4 |
| 137/17 | 17/01436-1 | Víðkan av Farstøðini | 5 |
| 138/17 | 14/01679-3 | Innrætting av Saltsølubygninginum | 6 |
| 139/17 | 17/00682-3 | Advokatfelagið : Umsókn um góðkenning av broytingum í viðtøkunum fyri Eigarafelagið Berjabrekka (1. byggistig) | 13 |
| 140/17 | 14/02585-1 | Kirkjugarðurin við Velbastaðvegin - víðkan av gravøki móti Sandá | 15 |
| 141/17 | 17/01026-7 | Umsókn um byggiloyvi til laðing av grótgarði fram við matr. nr. 640f, Skansavegur 1, Tórshavn | 19 |
| 142/17 | 14/03895-43 | Skúlin við Løgmannabreyt : Endalig uppgerð - ósemja millum Búsetur og TK (2011-2676) | 21 |
| 143/17 | 17/01149-2 | Almennar hoyringar av broyttum byggisamtyktum uppraðfestast | 24 |
| 144/17 | 17/00503-1 | Serstøk byggisamtykt fyri matr. nr. 1116a, undir Gráasteini, Tórshavn | 27 |
| 145/17 | 17/00881-4 | umsókn frá SEV um at seta eina tranformarastøð á Velbastað. | 30 |
| 146/17 | 17/01099-1 | Uppskot til víðari framferð av húsinum í Brekkugrund | 32 |
| 147/17 | 17/01262-2 | Uppskot um broyting í reglugerðini | 34 |
| 148/17 | 16/01873-1 | Fíggjarætlan 2017 | 37 |
| 149/17 | 17/01274-1 | Framflytingar roknskaparárið 2016 | 50 |
| 150/17 | 17/01599-1 | Roknskaparreglugerð hjá Tórshavnar kommunu 2017 | 52 |
| 151/17 | 17/00303-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2017 | 53 |

***<u>135/17 Mál beind í nevndir 2017</u>***

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 26.01.2017 | 42/17 | 17/00041-1 |
| 2 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 61/17 | 17/00041-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.03.2017 | 92/17 | 17/00041-1 |
| 4 Býráðsfundur | 27.04.2017 | 117/17 | 17/00041-1 |
| 5 Býráðsfundur | 23.05.2017 | 135/17 | 17/00041-1 |

**Málslýsing:**

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 26. januar 2017:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 30. mars 2017:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 27. apríl 2017:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 23. mai 2017:** Einmælt samtykt.

# 136/17 Útleigan av Sjóvinnuhúsinum til Fróðskaparsetrið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 15.05.2017 | 32/17 | 17/01434-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.05.2017 | 106/17 | 17/01434-1 |
| 3 Býráðsfundur | 23.05.2017 | 136/17 | 17/01434-1 |

**Málslýsing:**
Samráðingar hava í longri tíð verið um at leiga stóran part av Sjóvinnuhúsinum til Fróðskaparsetrið.

Áðrenn Fróðskaparsetrið flytur inn, skulu teir standa fyri tillagingum á 2, 4 og 5 hædd, sum teir skulu leiga, og Tórshavnar havn skal standa fyri at gera fyrilestrarsalin í siloini lidnan, sum Fróðskaparsetrið síðani eisini skal leiga.

Leigumálið tekur við so hvørt sum umbyggingin er liðug, tann seinasti parturin 1. desember 2017.

Uppskot er gjørt til leigusáttmála j.nr 17/01434-2.

Tá liðugt er at flyta inn, er tann samlaða leiguupphæddin kr. 4.573.212.

**Tilmæli:**
Havnameistarin mælir til at taka undir við uppskotinum til leigusáttmála.

**Vinnunevndin 15. mai 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. mai 2017:** Samtykt at taka undir við vinnunevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mai 2017:** Einmælt samtykt, at Gunnvør Balle fór av fundi meðan málið varð viðgjørt og Jógvan Arge tók sæti í staðin.

Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini.

# 137/17 Víðkan av Farstøðini

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 05.05.2017 | 27/17 | 17/01436-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.05.2017 | 105/17 | 17/01436-1 |
| 3 Býráðsfundur | 23.05.2017 | 137/17 | 17/01436-1 |

**Málslýsing:**
Verðandi farstøð bleiv tikin í brúk seinast í 80 árunum. Tá verandi Norrøna kom í 2004 bleiv nýtt trapputorn bygt, og smærri tillagingar vóru gjørdar.

Flutningurin av ferðafólki veksur støðugt, og ferðast tað árliga umleið 400.000 ferðafólk gjøgnum farstøðina, sum antin skulu við Norrønu ella Smyrli.

Serliga er tað Norrøna, sum hevur sera vánaligar umstøður til tey ferðandi, sum ikki kunnu koma undir tak, meðan tey bíða eftir at koma umborð.

Hetta er ein átroðkandi trupulleiki, sum ikki kann bíða í fleiri ár. Av tí at plássið er avmarkað at byggja á, má trupulleikin loysast í verandi farstøð.
Tað ber til at umbyggja farstøðina, soleiðis at fermetratalið umleið tvífaldast.

Arbeiðið skal fíggjast av Tórshavnar havn, og skal av fíggjarkarminum fyri 2017/2018.

**Tilmæli:**
Havnameistarin mælir til at taka undir við ætlanini, og at játta kr.223.000 til byggiprogram og skipanaruppskot.

**Vinnunevndin 05. mai 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. mai 2017:** Samtykt at taka undir við vinnunevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mai 2017:** Einmælt samtykt.

# 138/17 Innrætting av Saltsølubygninginum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 10.03.2014 | 2/14 | 14/01679-3 |
| 2 Vinnunevndin | 11.08.2014 | 30/14 | 14/01679-3 |
| 3 Fíggjarnevndin | 14.08.2014 | 215/14 | 14/01679-3 |
| 4 Býráðsfundur | 14.08.2014 | 177/14 | 14/01679-3 |
| 5 Býráðsfundur | 18.09.2014 | 196/14 | 14/01679-3 |
| 6 Vinnunevndin | 18.09.2014 | 32/14 | 14/01679-3 |
| 7 Fíggjarnevndin | 18.09.2014 | 256/14 | 14/01679-3 |
| 8 Vinnunevndin | 01.06.2015 | 18/15 | 14/01679-3 |
| 9 Fíggjarnevndin | 10.06.2015 | 143/15 | 14/01679-3 |
| 10 Býráðsfundur | 22.06.2015 | 116/15 | 14/01679-3 |
| 11 Vinnunevndin | 15.05.2017 | 31/17 | 14/01679-3 |
| 12 Fíggjarnevndin | 16.05.2017 | 107/17 | 14/01679-3 |
| 13 Býráðsfundur | 23.05.2017 | 138/17 | 14/01679-3 |

**Málslýsing:**
Innrætting av Saltsølubygninginum

Arbeiðið at klæða saltsølubygningin á Vestaru bryggju, verður væntandi liðugt í august 2013.

Tá tað er liðugt at klæða, ber til at innrætta bygningin av nýggjum. Verðandi innrætting er fyri tað mesta í vánaligum standi, og eigur tí at verða burturbeind og gjørd av nýggjum.

Bygningurin stendur á havnaøki, og er tað tí natúrligt, at hann verður brúktur til virksemi, í hevur samband við sjóvinnu. Hann eigur at innrættast soleiðis, at hann kann brúkast til ymiskar tørvir, og til fleiri smærri og kanska onkra miðalstóra fyritøku.

Leiguupphæddin verður avspeglað í íløgukostnaðinum, tí skulu loysnir finnast, har tað er ein standard leigupakki, hvar tað so er møguligt at velja ymiskar kvalitetir til.

Mælt verður til gera byggiprogram og dispositiósuppskot.

Arbeiðið at gera dispositiónsuppskot verður fíggjað av rakstri hjá Tórshavnar havn.

**Tilmæli frá havnameistaranum:**
Mælt verður til at gera byggiprogram og dispositiónsuppskot. Arbeiðið at gera dispositiónsuppskot, verður fíggjað av rakstri hjá Tórshavnar havn.

**Vinnunevndin 21. mai 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Vinnusamskiparin á Tórshavnar havn leggur fram uppskot til leigukonsept og skipan av innihaldi í saltsølubygninginum, sum nevndin síðani umrøður og tekur støðu til.

**Vinnunevndin 2. august 2013:**
Nevndin samtykti at heimila umsitingini at arbeiða víðari eftir framlagda leisti.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur arbeitt víðari við uppskotinum um leigukonsept og skipan av innihaldi í saltsølubygninginum.

**Tilmæli frá havnameistaranum:**
Mælt verður til at at taka undir við uppskotinum, og at leggja tað alment fram, soleiðis at møguligir leigarar kunnu geva sín áhuga til kennar.

**Vinnunevndin 26. august 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Uppskot til byggiprogram og dispotiónsuppskot er gjørt og undir einum nevnt skipanaruppskot.

Tað samlaða skipanaruppskotið er goymt undir journal nr. 2013-1269.

Úrdrag úr skipanaruppskotinum:
Bygningurin er í 5 hæddum, sum skulu innrættast til 2.799 $m^2$ skrivstovur, 288 $m^2$ til WC/brúsurúm, 2.152 $m^2$ til felagsøki/trappur, 710 $m^2$ til goymslu, 360 $m^2$ til verkstað, 75 $m^2$ til tøknirúm, 579 $m^2$ til matstað og 238 $m^2$ til annað.

Uppskotið leggur upp til, at smærri fyritøkur kunnu deilast um ávísar felags funktiónir, so sum fundarhølir, prent, kantinu o.s.fr.
Nakrar kjarnur verða gjøgnumgangandi á øllum hæddum, t.e. trappur, wc og slokur til innleggingar.

Góðskustøðið á ymsu økjunum verður fjølbroytt. Av tí, at verkstøð og goymslur skulu virka í sama bygningi sum matstova og skrivstovur, verður spennið stórt millum rá arbeiðsrúm og tignarlig fundarrúm.

Ætlanin er, at nýbyggingin skal liva upp til øll dagsins krøv til nýmótans altjóða skrivstovu umhvørvi, samstundis sum spor av gamla saltsølubygninginum verða varðveitt. T.d. er ætlanin, at innsíðan av útveggjum eru gomlu betongveggirnir, sum bert verða pussaðir og málaðir.

Skrivstovuøkini liggja fram við útveggjunum, við undantak av á 1.- 2.- og 3. hædd, har onki ljós kemur til í tí partinum, sum vendir norðureftir móti Bacalao. Skrivstovuøkini verða skyldraði frá høvuðsgongdini gjøgnum bygningin, men ikki deild upp í smærri skrivstovur. Loysnir fyri uppdeiling í smærri skrivstovur skal finnast, sum so leigarin ger eftir tørvi.

Bygningurin verður upphitaður við sjógvhita.

Mettur kostnaður til projektering er kr.3.653.000, umframt kr.527.000 sum er brúkt til skipanaruppskot og fyrireiking.
Projekteringin tekur umleið 4 mánaðir.

Byggingin tekur væntandi 18 mánaðir, frá undirskriving av arbeiðstøkusáttmála til avlevering.

Mettur kostnaður fyri innrætting 59 mió.

**Útleigan**

Aftan á at leigukonseptið fyri bygningin hevur ligið alment frammi, hevur tað verið ein ávísur áhugi fyri at leiga í bygninginum, men tað eru ikki allir leigararnir, sum hóska so væl til ætlaninar, tað at fyritøkurnar í høvuðsheitum skuldu arbeiða við sjóvinnu og menning av hesari.

Um tað verður leigað til øll tey, sum hava víst áhuga, er bygningurin fult útleigaður. Mælt verður til at leiga út til tær fyritøkurnar, sum vit halda passa til konseptið, fyri eisini at geva pláss til meira hóskandi leigarar, sum koma við tíðini.

**Tilmæli:**
Havnameistarin mælir til at taka undir við skipanaruppskotinum, og at játta kr. 4,18 mió til skipanaruppskot og endaliga projektering, og at arbeiðið eftirfylgjandi verður bjóðað út í innbodnari fakenterprisu.

Mælt verður eisini til, at gera eitt sokallað «memorandum of understanding» við tær fyritøkurnar, sum hóska til konseptið, soleiðis at tær kunnu flyta inn í bygningin, tá hann er liðugt umvældur.

**Vinnunevndin 25. november 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 4. desember 2013:** Samtykt at taka undir við vinnunevndini og játta kr. 4,18 mió. av íløgukarminum hjá Tórshavnar havn fyri 2013 og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 12. desember 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Uppskot til skitsuprojekt er gjørt, og verður lagt fyri nevndina.

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til at góðkenna skitsuprojektið

Umboð fyri SNA Arkitektar kemur á fundin at greiða frá.

**Vinnunevndin 10. mars 2014:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

Umboð fyri SNA Arkitektar greiddi frá málinum.

**Ískoyti:**
Arbeiðið hevur verið boðið út í innbodnari fakenterprisu. Tilboðini vóru opnaðið tann 16. juni 2014.

Áðrenn farið varð undir projektering av innrætting, varð samlaði kostnaðurin mettur til kr. 59 mió.

Beint áðrenn tilboðini vórðu opnaðið, metti rágevarin at kostnaðurin bleiv kr. 64,5 mió, umframt ókent og projektering/eftirlit.

Fyri at fáa kostnaðin nakað niður hava samráðingar verið við teir, sum høvdu tey lægstu tilboðini, umframt at sjógvhitin og fyrilestrarsalurin í siloni er tikin burtur úr projektinum.
Ístaðin fyri sjógvhita, er gjørt klárt til at binda í ein møguligan framtíðar fjarðhita.

Samráðst hevur verið við allar teir, sum høvdu lægsta tilboðið, uttan ElNet, sum er í summarfrí. Sáttmálaupphæddin fyri el, er tí ein meting.
Aftan á samráðingar er støðan hendan:

| Slag | Arbeiðstakarar | Meting 2013 mió kr. | Meting 2014 mió kr. | Tilboð mió kr. | Sáttmáli mió kr. |
|---|---|---|---|---|---|
| **Bygnings** | Húsavarðatæn. | | 26.3 | 35.4 | 32.5 |
| **Gólv** | Jims Gólválegging | | 2.4 | 3.2 | 2.1 |
| **Málari** | Uni Zacariasen | | 2.0 | 1.7 | 1.6 |
| **Múrari** | Articon | | 5.7 | 8.3 | 5.2 |
| **El** | ELNet | | 11.2 | 9.4 | 8.6 |
| **HVS** | Renovent | | 16.9 | 17.5 | 14.5 |
| **Arbeiðstøku-upphædd** | | | **64.5** | **75.5** | **64.5** |
| **Trygging,ókent, eftirlit o.a** | | | | | 9.4 |
| **Saml. kostn** | | **59.0** | | | **73.9** |

Um so er, at tað í byggitíðini verður tikið støða til, at gera fyrilestrarsalin lidnan, kann hettar gerast fyri 4.5 mió kr.

Um tikið verður undir við at innrætta fyri 73,9 mió kr., er samalði kostnaðurin fyri innrætting og klæðing umleið 94 mió.
Hetta merkir, at vit fáa 7.100 $m^2$ fyri góðar 13.200 kr/$m^2$

**Tilmæli:**
Havnameistarin mælir til at gera arbeiðtøkusáttmálar sambært nevnda uppskoti, og at játta 73,9 mió kr, at fíggja av íløgum hjá Tórshavnar havn fyri 2014 og 2015.

**Vinnunevndin 11. august 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 14. august 2014:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein, samtykkir at taka undir við vinnunevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðsfundir 14. august 2014:** Marin Katrina Frýdal setti fram soljóðandi broytingaruppskot: Mælt verður til, at bygningurin burturav verður upphitaður við sjóvarhita, og at málið verður beint aftur í vinnunevndina til at útvega neyðuga fígging.

Fyrst varð atkvøtt um uppskotið hjá Marinu Katrinu Frýdal at beina málið aftur í nevnd, ið fall við 5 atkvøðum fyri og fimm ímóti, meðan 4 býráðslimir ikki greiddu atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Jógvan Arge, Elin Lindenskov, Sigrún Mohr, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen.

Greiddu ikki atkvøðu: Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Jákup Dam.

Jógvan Arge setti síðani fram soljoðandi broytingaruppskot:

Mælt verður býráðnum til at taka undir við, at bygningurin burturav verður upphitaður við sjóvarhita, fíggjað av íløgum hjá Tórshavnar havn fyri 2014 og 2015.

Broytingaruppskotið hjá Jógvani Arge fall við 3 atkvøðum fyri og 8 ímóti. 2 býráðslimir greiddu ikki atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen.

Greiddu ikki atkvøðu: Elin Lindenskov og Sigrún Mohr.

Borgarstjórin setti síðani fram soljóðandi broytingaruppskot:

Mælt verður býráðnum til at taka undir við vinnunevndini við teirri broyting, at spurningurin um endaliga orkuloysn verður lagdur fyri býráðið aftur í seinasta lagi um tveir mánaðir.

Broytingaruppskotið hjá borgarstjóranum varð samtykt við 10 atkvøðum fyri, ongari ímóti, og 3 býráðslimir greiddu ikki atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Tróndur Sigurðsson, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Sigrún Mohr.

Greiddu ikki atkvøðu: Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

**Ískoyti:**
SNA, sum hevur staðið fyri projekteringini av bygninginum, hevur saman við SMJ, sum hava staðið fyri projektering av hitaverkinum, gjørt eina meting av meirkostnaðinum fyri at brúka sjógvhita til upphiting, og hvussu nógv ár ganga, til íløgan er afturgoldin. (sí skjal j.nr. 14/01679-9)

Meirkostnaðurin er mettur til kr. 4.177.470.

Mett verður, at íløgan er afturgoldin um á leið 30 ár.

**Vinnunevndin 18. september 2014:** Ein meiriluti, Sjúrður Olsen, Halla Samuelsen, Jákup Dam og Bjørghild Djurhuus, mælir býráðnum til at hita bygningin við sjóhita og at fíggja meirútreiðsluna við møguligum sparingum á projektinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur støðu á einum seinni fundi.

**Fíggjarnevnd 18. september 2014:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Sjúrður Olsen, Annfinn Brekkstein og Marin Katrina Frýdal, mælir býráðnum til at taka undir við vinnunevndini.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðsfundir 18. september 2014:** Einmælt samtykt at taka undir við meirilutanum í fíggjarnevndini.

**Ískoyti:**
Vinnunevndin samtykti á fundi tann 18. september 2014 at hita bygningin við sjóhita, sum kostaði kr. 4.177.470,- og at hetta skuldi fíggjast við sparingum. Tað hevur ikki eydnast at finna neyðugar sparingar.

Fyrilestrarsalurin, sum er tann ovasti parturin av siloini, bleiv tikin burtur úr projektinum, men hesin kundi verða tikin innaftur í projektið fyri 4,5 mió.
Fyrilestrarsalurin hevur í verðandi uppskoti ikki vindeygu. Um fyrilestrarsalurin hevur vindeygu, kann hann nýtast til ymisk endamál. Íseting av vindeygum kostar 1,25 mió.
Fyri at fáa meira nyttu burtur úr húsinum, er fyrilestrarsalurin ein týðandi partur.

Óvantaðar útreiðslur av at byggja fyrilestrarsal v.m í restini av byggitíðini eru mettar til 0,5 mió.

| Meirkostnaður: | |
|---|---|
| Sjógvhiti | 4.177.470 |
| Fyrilestrarsalur | 4.500.000 |
| Vindeygu | 1.250.000 |
| Óvantað | 500.000 |
| Samlað | 10.427.470 |

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til at samtykkja at játta kr. 10.427.470 til liðugtgerð av Sjóvinnuhúsinum, at fíggja av íløgum hjá Tórshavnar havn 2015.

**Vinnunevndin 01. juni 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 10. juni 2015:** Samtykt at taka undir við vinnunevndini og at beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundir 22. juni 2015:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

Fyrilestrarsalur:
Í samlaðu játtanini var peningur ikki avsettur til endaliga liðugtgerð av fyrilestrarsali. Hædd var ikki tikin fyri ljóðviðurskiftum (aukustikki), stólum og ljóð/ ljós útgerð, tí ivasamt var, hvat hølini skuldu brúkast til.

Tilboð er komið upp á ljós/ljóð útgerð, eins og tilboð er komið frá teimum, sum eru á staðnum, og hava staðið fyri tí, sum er gjørt.
Kostnaðurin fyri hettar er kr.  2.972.614.

Køkur:
Tá avtala var gjørd um umvæling, var avgjørt ikki at gera gólv, loft og veggir í køkin, eins væl og onnur útgerð heldur ikki var við í tilboðnum. Ætlanin var, at tann, sum leigar hølini, skuldi standa fyri umvæling og útbúnaði.

Við tí í huga, at ein møguligur leigari skal kunna taka útgerðina við, tá hann flytur út, er tað helst rættast at útleigarin (Tórshavnar havn) stendur fyri gerð av gólvi, lofti, veggjum, HVS, el og ventilatión.
Kostnaðurin fyri hetta er kr 870.399.

Av ymiskum grundum er arbeiðið at gera bygningin endalig lidnan, seinkað nógv. Hettar hevur ikki gjørt arbeiðið biligari. Fyri at kunna gera bygningin endaliga lidnan er neyðugt at játta kr. 500.000 til prís- og lønarvøkstur o.a.

**Tilmæli frá havnarmeistaranum:** Mælt verður til at játta tilsamans 4.343.013 til liðugtgerð av fyrilestrarsali, køki og til prís og lønarvøkstur, at fíggja av íløgkarminum fyri Tórshavnar havn 2017.

**Vinnunevndin 15. mai 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. mai 2017:** Samtykt at taka undir við vinnunevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mai 2017:** Einmælt samtykt.

# 139/17 Advokatfelagið : Umsókn um góðkenning av broytingum í viðtøkunum fyri Eigarafelagið Berjabrekka (1. byggistig)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.03.2017 | 57/17 | 17/00682-3 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.04.2017 | 82/17 | 17/00682-3 |
| 3 Fíggjarnevndin | 16.05.2017 | 108/17 | 17/00682-3 |
| 4 Býráðsfundur | 23.05.2017 | 139/17 | 17/00682-3 |

**Málslýsing:**
Eigarafelagið Berjabrekka (1. byggistig)  biðja um, at viðtøkubroytingin, framd á eykaaðalfundi 10. sep. 2016, verður góðkend av Tórshavnar kommunu.

Talan er um striking av grein 14A, 2. reglubrot, 1. pkt. í viðtøkunum:

*"Felags viðlíkahaldið fevnir eisini um uttanveggja viðlíkahald av húsaklædningi, høvuðsdyr, vindeygu, herundir eisini máling uttan."*

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla til at samtykkja viðtøkubroytingina

**Fíggjarnevndin 22. mars 2017:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2017:** Útsett.

**Ískoyti:** Ein av íbúgvunum í Berjabrekku hevur vent sær til Tórshavnar kommunu, tí viðkomandi heldur tað vera skeivt at strika grein 14A, 2. reglubrot, 1. pkt. Í viðtøkunum. Viðkomandi hevur keypt íbúð í Berjabrekku og heldur nú, at viðkomandi hevur keypt íbúðina undir skeivum fortreytum, nú samtykt er at broyta viðtøkurnar og áleggja eigarunum av ognunum í Berjabrekku at hava ábyrgdina av viðlíkahaldinum av ognini uttanveggja – ein ábyrgd, ið higartil hevur verið felags sambært viðtøkunum.

Forkvinnan í eigarafelagnum hevur upplýst, at hóast tað er ásett í viðtøkunum, at viðlíkahaldið er ein felags uppgáva, so hevur hetta ikki verið so í veruleikanum. Eigarafelagið hevur í ávísum førum roynt at veitt íbúgvunum avsláttur til máling og annað, tá ið viðlíkahald skuldi gerast, men útreiðslurnar av hesum og sjálvt arbeiðið at mála, umvæla v.m. hevur ligið á viðkomandi eigara. Forkvinnan hevur harumframt upplýst, at tað ikki finst nakar grunnur við uppspardum peningi til viðlíkahald, og tí hevur felagið ikki fíggjarliga orku at standa fyri felags viðlíkahaldinum. Umsóknin at broyta viðtøkurnar er tískil bert ein tillaging til umstøðurnar, sum tær veruliga eru.

Hóast tað er ásett í viðtøkunum fyri Berjabrekku, at Tórshavnar kommuna skal góðkenna viðtøkubroytingar, so verður tað ikki mett, at kommunan eigur at leggja seg útí, hvussu

íbúgvarnir skipa síni viðurskifti innanhýsis í mun til viðlíkahald og felags viðlíkahald av ognum sínum. Tá ið aðalfundurin eftir øllum at døma er lógliga innkallaður, og tað sama ger seg galdandi viðvíkjandi eykaaðalfundinum, verður mælt til at góðkenna tær viðtøkubroytingar, sum ein meiriluti samtykti á eykaaðalfundi tann 10. september 2016.

Í tann mun broytingin hevur óhepnar avleiðingar fyri íbúgvarnar ella onkrar av íbúgvunum verður mett, at hetta eru viðurskifti, ið íbúgvarnir sjálvir mugu loysa sínamillum og við eigarafelagið.

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin á Løgdeildini mæla til at samtykkja viðtøkubroytingarnar soleiðis sum tær eru samtyktar á eykaaðalfundi.

**Fíggjarnevndin 16. mai 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mai 2017:** Einmælt samtykt.

# 140/17 Kirkjugarðurin við Velbastaðvegin - víðkan av gravøki móti Sandá

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 30.04.2014 | 125/14 | 14/02585-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 01.05.2014 | 105/14 | 14/02585-1 |
| 3 Býráðsfundur | 22.05.2014 | 103/14 | 14/02585-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.11.2015 | 244/15 | 14/02585-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 02.12.2015 | 311/15 | 14/02585-1 |
| 6 Býráðsfundur | 10.12.2015 | 242/15 | 14/02585-1 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.04.2017 | 78/17 | 14/02585-1 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.05.2017 | 111/17 | 14/02585-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 16.05.2017 | 116/17 | 14/02585-1 |
| 10 Býráðsfundur | 23.05.2017 | 140/17 | 14/02585-1 |

**Lýsing av málinum-samandráttur:**
Seinast í nitiárunum varð farið undir at grava í nýtt graviøki suðurvestanvert Kapellið. Hetta økið varð tá mett tilsamans at rúma 1355 gravum. Verandi bruttovíddartørvur á einari grøv er uml. 4,5 m². Tá eru vegir og gøtur íroknað, og svarar tað til 560m² av nýggjum øki um árið. Tørvur er á at fara undir at fyrireika nýtt grevstrarøki.

Talið á jarðarferðum her er uml. 140 um árið. Mett verður at nýtt gravøki skal vera tøkt at grava í um 2-3 ár. Talið á jarðarferðum veksur ár um ár, og við tí eisini víddartørvurin. Mælt verður til víðkanar projektið fevnir um í minsta lagi 10.000 m².
Arbeitt hevur verið á býarskipanardeildini við uppskotum um, hvussu økið kann skipast.

Matr.nr.: Partar av 1073,1071, 1068 og 1067
Eigari: Tórshavnar kommuna
Staðseting : Millum Glyvursveg, Vegin í Vika og Sandá
Vídd samlað økisvídd: uml. 40.000 m²
Verandi víddartørvur : 10.000 m²
Friðingar: Náttúrufriðing
Verandi brúk: Traðarbrúk, beitilendi og leigumál
Kloakk: Høvuðskloakk gongur gjøgnum økið
Atkomuviðurskifti: Velbastaðvegur og vegurin í Vika.
P-pláss: Verandi p-rkering við kirkjugarðin og skipan av nýggjum
Áskot/mold: Tørvur á áskoti 25%
Fíggjarlig binding: 23-25 mill.

**Lendiseyðkenni:**
Vestur–eysturgangandi áardalur sum rennur út i Sandagerði. Landslagið horvir suðurvestureftir oman móti Sandá. Sunnanfyri ánna, Argjamegin, liggja sethúsaøki digst oman til ánna. Frítt útsýni er av Kongavarða og vesturargjum oman í kirkjugarðåin, meðam hann ikki sæst væl frá Havnasíðuni. Kirkjugarðurin kemur at liggja millum Glyvursvegin, Vikavegin og Sandá. At Glyvursvegur og brúgvin verða bygd fyri vestan, fer væntandi at skapa eitt betri veðurlag á kirkjugarðinum. Nakað av lívd fyri vestanættunum, ið liggja tráðar oman gjøgnum Havnardal.
Verandi nýtsla er traðarbrúk. Økini eru leigað út við sáttmálum til traðarbrúkarar. Mest til beiti fyri seyð, ross og flogfenað. Hesir sáttmálar mugu sigast upp í góðari tíð framman undan.

Ávirkan á nærøkini verður mett lítil, liggur ikki áloypandi í lendinum. Og hædd verður tikin fyri nærleika til Sandá.

Víðkananmøguleikar: Samlaða økisvíddin er uml. 40.000 m². Skotið verður upp at arbeiða vestanífrá Glyvursvegi, og harfrá suðureftir í stigum. Í fyrstu atløgu at byrja við 10.000 m².

**Lógir og ásetingar o.a.:**
Umhvørvisárin verður flokka í umhvørvisbólki??
Náttúrufriðingarlógin Sandá er á, sum er breiðari enn 4. m í botninum, og krevur viðgerð av friðingarrnevndunum,

Matriklarnir liggja í umráðispartinum D1, í byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Verandi kirkjugarður er eisini merktur D1.
Atkomuviðurskifti: Góðir og stórir vegir føra til kirkjugarðin. Parkeringin skal viðgerast og útbyggjast.

Skotið verður upp at fremja víðkanina í fýra stigum umleið 10.000 m² hvørt umfar, so sum higartil er farið fram. Samlað bruttovídd á víðkanarøki er 40.000 m²
Søkt verður um at fara undir projektering, og at arbeiðið verður boðið út í innbodna lisitatión.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarskipanardeildin mæla nevndini til at góðkenna fyriliggjandi heildarskitsuuppskot til staðseting og skipan. Harumframt at veita loypandi 3 mill. kr. um árið av íløgum, til projektering, útbjóðingartilfar og fremjing av ætlan, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 30. april 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 01. maj 2014:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 22. mai 2014:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Býarskipanardeildin hevur gjørt kravfestingar til málið um víðkan av kirkjugarðinum við Velbastaðvegin, sí hjálagda kravfestingarskjal. Fyrsta byggistig fevnir um lendi til 1075 gravir, at skipa øki til 100 parkeringspláss og at skipa atkomuveg eftir vegnum í Vika. Umframt at garðurin skal girðast inni.

Kravfestingarnar siga, hvussu víðkanin av verandi kirkjugarði ynskist skipað. Kravfestingarnar eru grundskjal undir uppskoti til skipan, projektering, myndugleikagóðkenning/Føroya Stift, friðingarviðgerð. Ætlan er at bjóða projekteringina út í innboðnari lisitasjón. Tilboðini verða løgd fyri nevnd aftur, tá tey eru innkomin.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at taka undir við kravfestingarskjølunum, og at bjóða projekteringina út.
Mælt verður eisini til at játta kr. 500.000,- av karminum á konto 6275 Kirkjugarðar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. november 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 02. december 2015:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 10. desember 2015:** Einmælt samtykt.

**Ìskoyti:**
Fyri at vísa á tørvin á nýggjum grevstarøki, hevur umsitingin gjørt grevstrarstøðuna upp í Kirkjugarðinum við Velbastaðvegin.

Niðanfyri sæst yvirlit, sum vísir hvussu grivið hevur verið seinastu tvey árini. Hvussu nógvar gravir eru grivnar og hvar grivið hevur verið.

| Árstal | Gravir tils. | Dupultgrøv * | Einkultgrøv | Jarðað í gl. Øki ** |
|---|---|---|---|---|
| 2015 | 108 | 39 – 78* | 22 | 47 |
| 2016 | 125 | 41 – 82* | 18 | 66 |

* 39 dupultar gravir grivnar í nýtt útlagt øki, víddar tørvur tils.78 leiði.
** jarðað í verandi gamla gravøkið, samgrevstur oftast hjún

Av hesum sæst, at umleið helvtin av øllum teimum, sum verða grivin, fara í tað gamla økið, meðan hini fara øll, pør og støk, í nýtt gravøki.

Í dag eru uml. 200 gravstøð íalt eftir í grevstrarøkinum, og er tað sambært omanfyri standandi í besta fall nóg mikið til 1-1,5 ár fram.

Sum gongdin hevur verið higartil í 2017, eru nú longu 40 grivin, og kann væntast, at samlaða talið fyri árið, verður nakað hægri enn 130.

At gera nýggj gravøki tekur um 1,5 ár. Fyrivarni skal  takast fyri, at moldin skal sjunka. Tískil er neyðugt at fara undir framhald av kirkjugarðsvíðkanini í kirkjugarðinum við Velbastaðvegin beinanvegin.

Mett verður, at sjálvt arbeiðið kann byrja miðjan juni 2017.
Neyðugt er at hava grevstarøki tøk at jarða í við ársenda í 2018.

Umsitingin hevur gjørt ráðgevaraavtalu við Hmp Consult at víðka verandi kirkjugarð við Velbastaðvegin mótvegis Sandá. Ráðgevaraarbeiðið er liðugt og verkætlanin klár at bjóða út. Sí viðhefta yvirlitsplan, j.nr. 14/02585-14.

Samlaða økið, sum er tøkt til víðkan av kirkjugarðinum er á leið 33.000 $m^2$. Byggistig I fevnir um økið á 11.000 $m^2$, sí viðheftu tekning, byggistig I, j.nr. 14/02585-15.  Talið á gravum í byggistig I er 1234.

Ætlanin er at bjóða byggistig I út soleiðis, at arbeiðstakarin átekur sær at gera alt byggistig I, tó yvir eitt longri tíðarskeið, soleiðis at vit tryggja okkum nøktandi gravir, tá vit hava tørv á teimum. Nágreining og arbeiðslag verður avgreitt saman við vinnandi arbeiðstakaranum.

Verkætlanin kann sostatt verða játtað í stigum í mun til ávísa arbeiðið, sum skal gerast, og arbeiðstakarin má leggja arbeiðið tilrættis eftir hesum treytum.

Verður omanfyri standandi leistur brúktur verður møguligt at játta peningin í stigum sum niðanfyri standandi:

2017: Kr. 3.800.000
2018: Kr. 4.000.000
2019: Kr. 4.000.000
2020: Kr. 4.000.000
2021: Kr. 4.000.000
2022: Kr. 4.000.000
2023: Kr. 4.000.000

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býararkitekurin mæla til at samtykkja omanfyri standandi útbjóðingarleist og at játta 3.8 mió. kr. av konto xxxx, íløgur í kirkjugarðar og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. apríl 2017:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Tað er alneyðugt at arbeiðið at víðka kirkjugarðin fer í gongd í ár. Av tí at onki er eftir á íløgu-játtanini, til kirkjugarðar í 2017, er neyðugt at finna játtanina á øðrum økjum hjá nevndini. Tað verður ikki mett, at framhaldið av arbeiðunum í Steinatúni og frílendinum við Hoydalsá fara í gongd í 2017. Tí er møguligt at flyta ein part av hesum játtanum til kirkjugarðin. Biðið verður um at kr. 2.500.000 verða játtaðar í 2017 soleiðis at arbeiðið kann byrja.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at játta kr. 2.500.000 til L65004 kirkjugarðurin við Velbastaðvegin og at flyta kr. 2.000.000 frá íløgukarminum á 6275 fríðkan av kommununi og kr. 500.000 av verkætlanini L62023 Frílendið við Hoydalsá. Eisini verður mælt til at játtanin til 6275 Fríðkan av kommununi hækkar samsvarandi í 2018 og at avseta neyðugu upphæddini til framhald av kirkjugarðinum í 2018 – 2023 og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. mai 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 16. mai 2017:** Samtykt at játta kr. 2.500.000 til L65004 kirkjugarðurin við Velbastaðvegin og at flyta kr. 2.000.000 frá íløgukarminum á 6275 fríðkan av kommununi og kr. 500.000 av verkætlanini L62023 Frílendið við Hoydalsá.

**Býráðsfundur 23. mai 2017:** Einmælt samtykt.

# 141/17 Umsókn um byggiloyvi til laðing av grótgarði fram við matr. nr. 640f, Skansavegur 1, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.05.2017 | 102/17 | 17/01026-7 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.05.2017 | 115/17 | 17/01026-7 |
| 3 Býráðsfundur | 23.05.2017 | 141/17 | 17/01026-7 |

**Málslýsing:**
Tann 1. mars 2017 søkir P/F Teigur um byggiloyvi til grótgarðslaðing framvið markinum á matr. nr. 640f.

Teldupost samskifti og fundur hevur verið millum umsøkjaran, býarskipan, byggideildina og løgdeildina um viðurskiftini, tí kommunan eigur lendið, sum garðurin verður laðaður á.

Býarskipan er samd um, at laðing á hesum stað er góð fyri báðar partar. Tað vil fríðka um økið.

Markið millum kommunalu ognina og grundøkið er sera krókut og illa dánað.

Løgdeildin og býarskipan mæla til at p/f Teigur ognar sær stykkið, uml. 30 fermetur, sum, tá grótlaðingin er liðug, verður tað nýggja markið.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Fornminnissavnið hevur fingið fráboðan um laðingina.

**Upplýsingar frá umsitingini**
At grótslagið, ið verður nýtt, er her úr umhvørvinum kring býin, og at laðingarsteinarnir ikki eru smágrót.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
eingi

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**
Eingi

**Fíggjarlig viðurskifti**
Umsøkjarin skal gjalda útreiðslur til matrikulering og skeyting.

**Viðmerkingar frá øðrum deildum**
Ongar, søkt er um graviloyvi

**Viðmerkingar frá øðrum myndugleikum**
Fornminnissavnið hevur fingið fráboðan um laðingina

**Skjøl**
17/01026-2 Myndakort
17/01026-4 Myndir

17/01026-1 Myndir

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at taka undir við staðsetingini av garðinum við treytum frá býarskipan, og at beina málið um keyp av lendinum í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. mai 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevnd at selja lendið fyri 800 kr. m2.

**Fíggjarnevndin 16. mai 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mai 2017:** Einmælt samtykt, at Helena Dam á Neystabø fór av fundi, meðan málið var viðgjørt.

Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini.

## 142/17 Skúlin við Løgmannabreyt : Endalig uppgerð - ósemja millum Búsetur og TK (2011-2676)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 21.10.2015 | 241/15 | 14/03895-43 |
| 2 Fíggjarnevndin | 09.03.2016 | 93/16 | 14/03895-43 |
| 3 Fíggjarnevndin | 16.05.2017 | 118/17 | 14/03895-43 |
| 4 Býráðsfundur | 23.05.2017 | 142/17 | 14/03895-43 |
| 5 Fíggjarnevndin | 23.05.2017 | 130/17 | 14/03895-43 |

**Málslýsing:**
**Búsetur/gerðarrættarmál**

Kunning verður løgd fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 21. mars 2012:**
Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Fíggjarnevndarlimur hevur biðið um at fáa málið á skrá

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2015:** Kunnað var um málið.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen, heita á partarnar um at finna semju í málinum skjótast gjørligt til tess at sleppa undan einum gerðaræettarmáli um ósemjuna, sum bert økir um útreiðslurnar hjá báðum pørtum.
**Ískoyti:**
Gerðarrættarmálið Búsetur
Royndin at finna semju hevur ikki eydnast. Advokaturin vegna Búsetur hevur heitt á gerðarrættinum um at seta málið í gongd aftur, og at kommunan ger duplik til teirra replik. Hesum hevur gerðarrætturin tikið undir við. Duplik skal vera inni 18. mars 2016.
Higartil hava partarnar veitt trygd uppá í alt kr. 400.000 fyri sakarmálskostnað v.m. Gerðarrætturin ger vart við, at henda upphædd verður at hækka til kr. 800.000, tvs., at hvør parturin rindar kr. 200.000 aftrat áðrenn 18. mars 2016.
**Tilmæli:**
Kommunustjórin og fyrisitingarstjórin mæla til at fíggja gjaldið kr. 200.000 av kontu 20910 Aðrar inntøkur.

**Fíggjarnevndin 09. marts 2016:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Jógvan Arge taka undir við tilmælinum og játta kr. 200.000 av konto 20910, aðrar inntøkur.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur ikki undir við tilmælinum og vísir til støðu sína á fundi 21. oktober 2015.

**Ískoyti:**
Við kæruriti frá Búsetur móti Tórshavnar kommunu (TK") byrjaði í mars 2012 gerðarrættarmál í mun til ósemjur um rindan av eykaútreiðslum v.m. tá Skúlin við Løgmannabreyt varð bygdur. Málskravið var soljóðandi:

| | |
|---|---|
| 18 fakturar íalt við mvg, u/rentur | 11.149.694 |
| Rentur roknaðar fram til 01.02.2012 | 1.544.498 |
| Íalt | 12.694.192 |

TK avvísti krøvini m.a. vísandi til, at:

1. Búsetur og TK á fundi í apríl 2010 høvdu gjørt endaliga og bindandi semju um tær flestu av teimum 18 óloystu trætunum
2. nógv av krøvunum hjá BS vóru burturdottin vegna fyrning ella passivitet
3. eingin avtala varð gjørd við BS um meirarbeiði, uttan so at avtaluseðil fyrst varð undirskrivaður og slíkir undirskrivaðir avtaluseðlar manglaðu sum stuðul fyri flestu eykakrøvunum
4. BS í stóran mun ikki hevði lagt fram skjal prógv fyri teirra krøvum um gjald fyri eykaarbeiðir, annað enn nógv seinkaðar fakturar

Eftir at partarnir høvdu lagt fram hópin av skjølum og løgfrøðiligum grundgevinum fyri gerðarrættin í mun til tey 18 krøvini, var ein deilviðgerð í gerðarrættinum serliga um fyrningar og passivitets spurningarnar í januar 2015. Gerðarrætturin kom m.a. til tær niðurstøður, at partarnir ikki hava gjørt endaliga og bindandi semju sínamillum um tey flestu av krøvunum og at 17 av krøvunum ikki eru fyrnaði ella burturdottn vegna passivitet, tó so at 18. og størsta kravið uppá 3.712.500 v/mvg varð dómt burturdottið vegna fyrning.

Síðani hava partarnir aftur lagt fram hópin av skjølum og løgfrøðiligum grundgevinum fyri gerðarrættin, umframt at semingsroyndir hava verið partanna millum 2 ferðir.

Havandi í huga

- prosesrisiko (vandin, sum er í øllum rættarmálum at tapa partar av ella alt málið)
- potentiellar rentur frá stevningsdegnum
- framtíðarútreiðslur til gerðarrættarlimirnar, umfatandi sýn & meting, advokatútreiðslur og Palla Henriksen, ráðgeva
- útreiðslur vegna alla tað tíð TK starvsfólk framhaldandi mugu nýta uppá málið um gerðarrættarmálið heldur áfram

varð prinsipiell semja gjørd millum partarnar í februar 2017 uppá kr. 4,4 mió umframt mvg. Semjan er treytað av politiskari undirtøku hjá TK.

**Fígging:**

Neyðugt er við eykajáttan fyri at útvega fígging til semjuna. Mælt verður til at fíggja semjuna soleiðis:

| | | |
|---|---|---|
| 20910 | Aðrar útreiðslur | 4.675.000 |
| 4175 | Dagføring skúlar | -2.129.248 |
| 20301 | Rentuútreiðslur | -2.545.752 |

Hjálagt er semjan millum Tórshavnar kommunu og spf Búsetur.

**Tilmæli**
Kommunustjórin, tekniski stjóri og leiðarin á Løgdeildini mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina at gera semju við spf. Búsetur áljóðandi 4,4 mió kr. + mvg á 6,25%, tilsamans 4.675.000 kr at fíggja av konto 20910.

Samstundis verður mælt til at flyta kr. 2.129.248 av konto 4175 Dagføring skúlar og kr. 2.545.752 av konto 20301 Rentuútreiðslur til konto 20910 Aðrar útreiðslur fyri at fíggja semjuna.

**Fíggjarnevndin 16. mai 2017:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal og Bergun Kass, taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir, vísandi til, at tala er um eykajáttan.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, taka undir við tilmælinum við teirri broyting, at 2.129.248 kr. verða at flyta av konto 6175, keyp og søla, og ikki av konto 4175, dagføring skúlar.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjóri og leiðarin á Løgdeildini mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina at gera semju við spf. Búsetur áljóðandi 4,4 mió kr. + mvg á 6,25%, tilsamans 4.675.000 kr at fíggja av konto 20910.

Samstundis verður mælt til at flyta kr. 2.503.000 av konto 6175 Keyp og søla og kr. 2.172.000 av konto 20301 Rentuútreiðslur til konto 20910 Aðrar útreiðslur fyri at fíggja semjuna.

**Fíggjarnevndin 23. mai 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 23. mai 2017:** Einmælt samtykt.

# 143/17 Almennar hoyringar av broyttum byggisamtyktum uppraðfestast

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.05.2017 | 104/17 | 17/01149-2 |
| 2 Býráðsfundur | 23.05.2017 | 143/17 | 17/01149-2 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Tórshavnar kommuna setir fólkið fremst og hevur sett sær fyri at skapa størri fólkaræði í kommununi, og at økja um gjøgnumskygni og opinleikan. Sostatt verður farið undir at uppraðfesta "Almennar hoyringar í samband við broyttar byggisamtyktir".

Ein meginregla handan vælskipað arbeiði við lendisætlanum og býarskipanararbeiði er, at borgarin er kunnaður á nøktandi hátt og somuleiðis hevur høvi at siga sína hugsan um tær ætlanir, sum myndugleikin hevur í kvittanum at fremja í verki, borgaranna vegna. Hettar styrkir kensluna av samognarskapi og inklusjón.

Í Føroyum er býarskipanararbeiðið skipað við ásetingum sbrt. Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir. Har er ásett í § 6, stk. 1, at*: "Áðrenn uppskot um byggisamtykt verður sent landsstýrismanninum, skal tað verða lagt fram í minsta lagi 3 vikur til alment eftirlits á einum fólki atkomuligum staði. Kommunan skal frammanundan á vanligan hátt kunngera, at byggisamtyktin er framløgd til eftirlits, og kunngerðin skal skila til, hvørt økið tað er, ið uppskotið umfatar. Mótmæli móti uppskotinum, og broytingaruppskot mega verða send kommunustýrinum, áðrenn 6 vikur eru lidnir frá kunngerðardegnum."*

Tá Býarskipanarlógin varð samtykt í 1954, vóru umstøðurnar at fyriskipa almenna fráboðan av góðum grundum ógvuliga avmarkaðar, samanborið við tøkniligu møguleikarnar nú á døgum. Kunngerð í "Svørtutalvu" og í "Dimmalætting" (ið var alment kunngerðarblað) vóru stórt sæð einastu formligu møguleikar tá á døgum, eins og upplýsingar um matrikulnummar og matrikulkort heldur ikki vóru vanligir. Tórshavn varð t.d. ikki formliga liðugt matrikulerað fyrr enn í 1966.

Allir hesir upplýsingar eru í dag tøkir hjá kommunalu fyrisitingini at arbeiða við, og tøkniligu møguleikarnir at framleiða nøktandi kunningartilfar eru somuleiðis við hondina í gerandisdegnum. Tí er ynskiligt, at støðið fyri eini nøktandi kunning til borgaran um ætlaðar broytingar í byggisamtykt, serstakari byggisamtykt ella øðrum líknandi broytingum í fastognartreytum, nýtslumøguleikum o.ø. viðurskiftum, verða fráboðað almenninginum eftir einum leisti, ið stendur mát við tað, borgarin væntar sær nú á døgum.

Ein nøktandi framløga av slíkum viðurskiftum inniheldur almenna fráboðan, bæði á heimasíðu kommununnar og við lýsing í hóskandi dagbløðum og tíðindaportalum, har boðað verður frá teirri ætlan, ið løgd er fram til alment eftirlit.

Sum áður nevnt, so ásetir lógin um býarskipanir og byggisamtyktir:

*§6, stk 1. ...Kommunan skal frammanundan á "vanligan hátt" kunngera, at byggisamtyktin er framløgd til eftirlits, og kunngerðin skal skila til, hvørt økið tað er, ið uppskotið umfatar....*

"Á vanligan hátt kunngera" verður lisið sum at kunngera á heimasíðu, skal lýsast í bløðum og framløgd í fysiskum formi á t.d. Snarskivuni. Tað eru eingi formlig krøv til t.d. at sendast skal

skriv til ávísar borgarar. Broyting av byggisamtykt er ikki ein fyrisitingarlig avgerð. Tað er eitt reguleringsamboð og meira at meta sum "lóggávubroyting" og rakar yvirskipað.

Tórshavnar kommuna er varug við, at broytingar ikki hava verið nóg sjónligar fyri borgaran og onnur í hoyringstíðarskeiðum. Tískil er ynski um at almennar hoyringar í samband við broyttar byggisamtyktir skulu uppraðfestast. Hetta kann verða gjørt á ymsan hátt.

Vanliga mannagongdin hevur verið, at nýggjar og broyttar byggisamtyktir eru lýstar við kunngerð, har broytingaruppskotið verður lýst við stuttum teksti. Oftani hava fleiri broytingar verið lýstar á somu kunngerð. Lýst hevur verið á hesum miðlum:

- Portal.fo í 4 dagar.
- Sosialurin 1 ferð.
- Sum kunngerð í torshavn.fo í 6 vikur.
- Harumframt hevur kunngerð saman við kortum ligið alment frammi á Snarskivuni í 3 vikur.

Henda mannagongd er fult í tráð við krøvini frá landsins myndugleikum, men hóast hetta ynskir kommunan at uppraðfesta hetta.

Eitt stig at gera broytingarnar meiri sjónligar fyri borgarin er, at umskipa lýsingarháttin við at hava meira lýsandi tekst, kort og myndir av økinum talan er um at broyta, umframt eitt yvirlit yvir hvussu langt viðgerðin av málinum er komin. Umframt at leggja broytingina á heimasíðuna sum tíðindi og alment tøka á Snarskivuni alt hoyringstíðarskeiðið, kundi ein møguleiki verið at lagt málið á Facebook sum tíðindi. Broytingar í byggisamtyktum sum tíðindi á heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu røkkur út til fleiri borgarar. Tað gerst sjónligt á høvuðssíðuni og samstundis fer tað beinleiðis út til teir borgarir, ið hava tilmeldað seg til at móttaka tíðindabræv við teldubrævi. Hesar uppraðfestingarnar hava ongar fíggjarligar avleiðingar og mælir umsitingin til at gera hetta sum part av vanligu mannagongdini.

Umsitingin arbeiðir í løtuni við at gera ein portal á heimasíðuni, sum lýsir broytingarnar betri og ger tær meiri sjónligar. Vísast kann til http://www.odense.dk/politik/hoeringsportalen , sum gevur íblástur til hetta.

Fyri at gera broytingar í byggisamtyktum enn meira sjónligar, er tað somuleiðis møguligt at lýsa við broytingunum á fleiri støðum/miðlum.

Møguligir miðlar eru:

| Miðil: | Partur av mannagongd? | Longd av lýsing | Kostnaður pr. kunngerð |
|---|---|---|---|
| Portal.fo | Verður brúkt | 4 dagar | 2.000,- |
| Sosialurin | Verður brúkt | 1 ferð | 2.500,- |
| Dimmalætting | Ikki brúkt | 1 ferð | 2.500,- |
| KVF útvarp | Ikki brúkt | 1 ferð | 2.000,- |
| KVF sjónvarp | Ikki brúkt | 1 ferð (30. sek) | 3.000,- |

Royndirnar vísa, at portal.fo verður umleið 3-4 ferðir meiri vitjað enn in.fo. T.d. sóu 284 fólk seinastu kunngerð um broyttar byggisamtyktir fyri 4 dagar tíðarskeiðið á portal.fo.

Í fjør vóru áleið 34 byggisamtyktir til hoyringar á 10 kunngerðum. Samlaði kostnaðurin fyri at lýsa við broyttu byggisamtyktunum var uml. kr. 45.000.

Uppskot hevur verið frammi um at gera *eina* kunngerð fyri hvørt mál, í mun til at hava fleiri mál lýst í hvørjari kunngerð. Hetta vildi gjørt lýsingina/broytingina meiri greiða og einfalda.

Um allar broyttar byggisamtyktir skulu lýsast á omanfyristandandi miðlum, verður kostnaðurin nakað hækkaður. Um útgangsstøðið er 34 broytingar um árið, so verður samlaði kostnaðurin á leið kr. 400.000 árliga.

Verða tað framvegis greipaðar nakrar byggisamtyktir saman í somu lýsing, tá ið tær fara í bløðini, so kann sparast uml. kr. 100.000 av samlaða kostnaðinum. Hetta tí bløðini fara við stórum parti av útreiðslunum eftir omanfyristandandi leistið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri og býararkitekturin mæla til at kunngjørt verður á fylgjandi hátt:

- á heimasíðu, bæði sum tíðindi og á síðuni fyri byggisamtyktir alt hoyringstíðarskeiðið (eina lýsing fyri hvørt mál)
- á Snarskivuni alt hoyringstíðarskeiðið (eina lýsing fyri hvørt mál)
- á Facebook sum tiðindi, við byrjan av hoyringstíðarskeiðnum (eina lýsing fyri hvørt mál)

Umframt at nevndin tekur støðu til, um miðlingin skal uppraðfestast á omanfyristandandi miðlum og umrøða um miðlingin kann raðfestast á annan hátt, og hvussu uppraðfestingin verður fíggjað.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. mai 2017:** Samtykt at miðlingin verður uppraðfest og at tað verður sett í verk beinanvegin.
Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 23. mai 2017:** Atkvøtt varð um tilmæli frá Annfinn Brekkstein, um at beina málið í fíggjarnevndina, ið fall við 6 atkvøðum fyri og 7 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen

Ímóti atkvøddu:
Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass

Kunnað varð um málið

## 144/17 Serstøk byggisamtykt fyri matr. nr. 1116a, undir Gráasteini, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.02.2017 | 35/17 | 17/00503-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.03.2017 | 61/17 | 17/00503-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.03.2017 | 106/17 | 17/00503-1 |
| 4 Býráðsfundur | 27.04.2017 | 128/17 | 17/00503-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.05.2017 | 103/17 | 17/00503-1 |
| 6 Býráðsfundur | 23.05.2017 | 144/17 | 17/00503-1 |

**Málslýsing:**
Eigarin av omanfyri nevndu ognum hevur vent sær til kommununa við einum uppskoti til útstykkingarætlan fyri matr. nr. 1118a og 1118b undir Gráasteini í Tórshavn.

Talan er um eina útstykking við 12 grundstykkjum, umframt núverandi sethús á ognini.
Grundstykkini eru millum 405 og 490 m² til víddar.

Vegatkoman til grundstykkini er frá trimum ymiskum vegum. Harumframt er eitt fríøki á 811 m² til víddar.

Gøtur eru ætlaðar at samanbinda grundstykkini. Hesar skulu verða í minsta lagi 2 m breiðar, vísandi til almennu byggisamtyktina, Kap. V. § 2. stk. 1 d. Tekniskar leiðingar skulu liggja har gøturnar eru.

Ognirnar liggja í A1 øki í 3. Grundumráðið, ætlað til sethús, tvíhús og raðhús. Av tí at grundstykkini eru minni enn 500 m² til støddar, má ein serstøk byggisamtykt gerast fyri at loyva útstykkingini.

Býarskipanardeildin hevur gjørt eitt uppskot til serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 1118a og 1118b, Tórshavn.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 1118a og 1118b og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. februar 2017:** Útsett.

**Ískoyti:**
Málið er broytt til eisini at viðvíkja matr. nr. 1116a undir Gráasteini, Tórshavn, soleiðis at tað er ein samlað serstøk byggisamtykt fyri matr. nr. 1116a, 1118a og 1118b undir Gráasteini, Tórshavn.

Talan er um eina útstykking við 12 grundøkjum til stakhús, 2 til tvíhús, 5 til raðhús, fríøki, núverandi sethús á matr. nr. 1118b og felags parkeringspláss, og skulu hesi skipast sum sýnt er á kortskjali 1.

Ognirnar liggja í A1 øki í 3. grundumráðið í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum er ætlað sethúsum, tvíhúsum og raðhúsum. Av tí at grundøkini eru minni enn 500 m² til støddar, má ein serstøk byggisamtykt gerast fyri at loyva útstykkingini.

Býarskipanardeildin hevur gjørt eitt uppskot til serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 1116a, 1118a og 1118b, Tórshavn.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 1116a, 1118a og 1118b, Tórshavn og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. mars 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.
Gunvør Balle luttók ikki í viðgerðini av málinum

**Býráðsfundur 30. mars 2017:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 27. apríl 2017:** Málið beint aftur í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Serstaka byggisamtyktin fyri matr. nr. 1116a, 1118a og 1118b varð umrødd eftir at eigararnir av matr. 1118a og 1118b fyri seinasta býráðsfund høvdu lagt klagu inn viðv. ásetingunum í byggisamtyktini.

Umsøkjari vísti á ymisk viðurskiftir, har tey hildu seg hava verið fyri mismuni í mun til grannaognina. Serliga var talan um fríøkið, har umsitingin vísti á, at grannaognin somuleiðis hevði nøktandi fríøkið.

Somuleiðis varð víst á, at teksturin í verandi byggisamtykt ikki var nøktandi og samsvarandi verandi viðurskiftir.

Umsitingin ásannar, at verandi byggisamtykt kundi verið betri nágreinað.

Niðurstøður frá fundinum vóru at mæla býráðnum til at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina, soleiðis at býarskipan kann fremja neyðugu broytingarnar, nágreina tekstin fyri útstykkingina viðv. matr. 1116a og leggja málið viðv. útstykkingini matr. nr. 1116a aftur fyri byggi- og býarskipanarnevndina á næst komandi fundi.

Umsitingin hevur síðani fundin gjørt neyðugu rættingarnar í serstøku byggisamtyktina, og arbeiðir byggideildin víðari við útstykkingarætlanini fyri matr. nr. 1118a og 1118b at leggja fyri nevndina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 1116a, Tórshavn og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. mai 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 23. mai 2017:** Einmælt samtykt.

# 145/17 umsókn frá SEV um at seta eina tranformarastøð á Velbastað.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.04.2017 | 72/17 | 17/00881-4 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.05.2017 | 114/17 | 17/00881-4 |
| 3 Býráðsfundur | 23.05.2017 | 145/17 | 17/00881-4 |

**Lýsing av málinum – samandráttur:**

SEV søkir um at byggja nýggja transformarastøð á Velbastað. Transformarastøðin kemur at standa í svinginum á Bakkavegi, Støðin verður til at kunna nøkta streymin til aliflakarnar á Velbastað.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Matr. nr. 7a Velbastað
Ábygt verður hús til víddar uml. 9,8 $m^2$
Umsóknin er send Búnaðarstovuna til viðgerðar.

**Lógir og ásetingar**
Økið liggur í "ásetingar fyri økið H", ið er frílendi í byggisamtyktini fyri Kirkjubøar kommunu.

**Umhvørvisárin**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1

**Fíggjarlig viðurskifti**
Føroya Jarðargrunnur eigur økið og kommunan skal leiga økið, har tranformarastøðin kemur at standa.

**Viðmerkingar frá øðrum deildum**
Hevur ikki verið á øðrum deildum.

**Viðmerkingar frá øðrum myndugleikum**
Umsóknin er send Búnaðarstovuni til viðgerðar.

**Skjøl**
j. nr. 17/00881 -1 Umsókn, tekningar og kort.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á bygg- og umhvørvisideildini mæla til at ganga umsóknini á møti, treytað av at teir byggja eitt av teimum trimum húsunum, ið er avtalað við kommununa og at kommunan leigar økið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**

Kommunan leigar lendi frá Búnaðarstovuni til Sev.
Árliga leigan er 500 kr., harumframt 1000 kr. avgreiðslugjald. Sáttmálin er galdandi í 10 ár.

**Tilmæli:**
Leiðarin á løgdeildini og kommunustjórin mæla til at leiga lendið frá Búnaðarstovuna fyri 500 kr árliga, harumframt 1000 kr. í avgreiðslugjald av konto 6111 «leiga traðir og økir».
Hjálagt sáttmáli.

**Fíggjarnevndin 16. mai 2017:** Samtykt at taka undir við leigusáttmálanum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mai 2017:** Einmælt samtykt, at Marin Katrina Frýdal fór av fundi, meðan málið varð viðgjørt.

Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini.

## 146/17 Uppskot til víðari framferð av húsinum í Brekkugrund

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.04.2017 | 76/17 | 17/01099-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.04.2017 | 86/17 | 17/01099-1 |
| 3 Býráðsfundur | 27.04.2017 | 130/17 | 17/01099-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.05.2017 | 107/17 | 17/01099-1 |
| 5 Býráðsfundur | 23.05.2017 | 146/17 | 17/01099-1 |

**Málslýsing:**
Húsaumsitingin hevur arbeitt við uppskoti til ætlan fyri arbeiðið at umvæla ognina á Bringsnagøtu 13, matr. nr. 120, Tórshavn.

Umvælingarnar av hesari ognini eru nógv størri enn væntað, so at siga alt húsið er rotið og skal gerast av nýggjum.

Vit hava arbeitt við tveimum loysnum, umvæling og byggjan av nýggjum.

Umvæling krevur, at útveggir verða gjørdir av nýggjum, har eru ongar konstruktiónir, sum bera ella stabilisera húsið. Sperrurnar í takinum skulu skiftast. Alt inni í húsinum skal gerast av nýggjum, tí tað er rotið. Gólvið skal gravast upp, og har má drenast bæði úti og inni. Við hesi loysn fáa vit ikki ein gott hús, og umvælingar mugu eisini gerast uttan, innan ikki ov leingi.

Hetta arbeiði kostar umleið 400.000,- kr. og tekur umleið 2-3 mánaðir. Sí frágreiðing dagfest 8. mars 2017.

Nýtt hús krevur, at húsið verður tikið niður, nýtt byggiloyvið og hoyring frá Reynanevndini. Húsið verður bygt uppaftur í saman sniði.

Hettar arbeiði kostar umleið 500.000,- og tekur umleið 4-5 mánaðir.

Húsaumsitingin hevur ikki sett pengar av til hesa umvæling í 2017.

Umsitingin er vitandi um at ynski er at fáa fleiri fólk at búgva økinum. Tí verður mælt til, at verður ognin seld, eigur bústaðarskylda at vera lýst í skeytinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Húsaumsitingini mæla til at nevndin tekur undir við at ognin verður seld og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. apríl 2017:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Bergun Kass, Bogi Andreasen og Helena D. á Neystabø, samtykti at taka undir við tilmælinum og at bústaðarskylda verður lýst í skeytinum, tá ognin verður seld.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2017:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal og Bergun Kass, tekur undir við meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, vísir til støðu sína í byggi- og býarskipanarnevndini 5. apríl 2017.

**Býráðsfundur 27. apríl 2017:** Atkvøtt varð um tilmæli frá Marin Katrinu Frýdal, um at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina, ið varð einmælt samtykt

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Sjúrður Olsen, Bergun Kass, Annfinn Brekkstein, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson, Heðin Mortensen og Gunvør Balle.

**Ískoyti:**
Húsini vórðu skrásett í Tórshavnar býaratlas, tá hetta varð varð gjørt í 2006, sí viðhefta kort.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. mai 2017:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam og Bogi Andreasen, vísir til samtyktina í byggi- og býarskipanarnevndini 5. apríl 2017 og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, vísir til støðu sína á fundinum í byggi- og býarskipanarnevndini 5. apríl 2017.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 23. mai 2017:** Samtykt við 7 atkøðum fyri og 6 ímóti at taka undir við meirilutanum í fíggjarnevndini.

Fyri atkvøddu:
Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass

Ímóti atkvøddu:
Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen

# 147/17 Uppskot um broyting í reglugerðini

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 19.04.2017 | 93/17 | 17/01262-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.05.2017 | 120/17 | 17/01262-2 |
| 3 Býráðsfundur | 23.05.2017 | 147/17 | 17/01262-2 |

**Málslýsing:**

Í 2016 vóru gjørdar tvær týðandi broytingar í reglugerðini. Onnur var at avtaka bíðilistarnir og fara yvir til tilmelding og lutakast, tá kommunan hevur ognir at luta út.

Hin var at loyva umsøkjarum undir útbúgving, ið eru búsitandi uttanfyri Tórshavnar kommunu at taka lut í útlutan, um tey hava ætlan um at flyta í Tórshavnar kommunu eftir lokna útbúgving og kunnu skjalprógva, at tey eru liðug við útbúgving sína innan eitt ár.

Ongin av hesum broytingum hevur enn staðið sína roynd, tí samtykt var eisini, at fyrst skuldu grundstykkini Undir Kongavarða og í Kollafirði bjóðast út eftir gomlu bíðilistunum.

Broytingarnar eru skilagóðar, men ivasamt er tann seinni broytingin røkkur sínum upprunaliga endamálið, sum var at lata upp fyri tilflytan, tí hon umrøður bert **lesandi**.

Tvs. at enn ber ikki til hjá fólki, ið ikki eru lesandi, men búgva í øðrum kommunum, ella í øðrum londum, at vera við í lutakastinum um fasta ognir og soleiðis planleggja flyting til Tórshavnar kommunu.

Sostatt kann sigast, at Tórshavnar Kommuna arbeiðir móti egnum áhugamálum. Vit siga, at vit ynskja vøkstur og at fólk flyta til kommununa, og vit vita at tey flestu vilja helst flyta til høvuðsstaðin, men vit veita ikki øllum javnbjóðis møguleika at seta búgv í kommununi.

Tað er eitt sera óheppi signal at senda hjá einum høvuðsstaði, sum helst skuldi staðið opin fyri øllum og eggja øllum at sær. Snarskivan fær javnan at vita frá fólki, ið spyrja seg fyri og hava áhuga at flyta til Tórshavnar kommunu, at tey skilja at kommunan soleiðis lokar av fyri tilflytarum, og óbeinleiðis sendir teir inn á Skálafjørðin, norður í Sundalagið ella vestur í Vágar.

Havast skal eisini í huga, at tað neyvan eru mest tey, ið júst eru um at enda lesnaðin, ið hava størsta hugin á einum grundstykki og eina milliónaskuld til hús, men heldur tey, ið antin búgva á bygd og arbeiða í Tórshavnar kommunu, ella tey, sum hava arbeitt í útlondum eina tíð og sum droyma um at venda heim.

Tá fíggjarnevnd og býráð áður hevur umrøtt at loyva øllum at vera við í lutakasti um fasta ognir, hevur størsta ivamálið millum politikkarar altíð verið vandin fyri, at fólk uttanfyri Tórshavnar kommunu keypa ognir, men eftirfylgjandi ikki flyta til kommununa.

**Tilmæli:**
Leiðarin á Snarskivuni og fyrisitingarstjórin mæla til at pkt. 7a og pkt 8 í reglugerðini verður strikað. Í staðin verður nýtt pkt 8 skrivað:

*«tá fólk, sum ikki hava bústað í Tórshavnar kommunu fáa tillutað fasta ogn við lutakasti, verður í fyrsti atløgu gjørd skriftlig avtala við umsøkjaran um, at afturfyri eitt depositum á 50% á metta kostnaðinum á ognini, verður ognin løgd til síðis í eitt ár til umsøkjaran. Er umsøkjarin ikki fluttur í kommununa innan eitt ár eftir lutakastið, verður depositum rindað aftur og ognin lutað øðrum umsøkjara. Flytir umsøkjarin heim innan eitt ár eftir lutakastið, verður keypssáttmáli gjørdur og ognin skeytað honum.*

Á henda hátt lata vit upp fyri øllum, men samstundis tryggja vit okkum, at bert tilflytarar, sum seriøst umhugsa at flyta til kommununa innanfyri næsta árið melda til. Eru ætlanirnar um at flyta heim longri frammi í tíðini, so kunnu tey melda til næstu ferð.

Við at upplýsa og krevja í sambandi við tilmeldingina, at tey góðtaka treytirnar um depostitum og at stykkið einans er lagt til síðis í eitt ár, binda vit okkum ikki til at lata teimum stykkið, fyrr enn tey lúka treytirnar um bústað í Tórshavnar kommunu. Og hinvegin eru tey púra leys av stykkinum, um tey skifta meining og ikki ynskja stykkið.

At krevja 50% av kostnaðinum í depositum kann ljóða nógv, men hetta sama upphædd, ið vit krevja frá teimum, sum hava bústað í kommununi. Munurin er bert at í teirra føri er talan um gjald og ikki depositum. So fíggjarliga verða øll javntsett eftir lutakastið.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2017:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Arbeitt hevur verið víðari við málinum í mun til kostnað og treytir.

**Tilmæli:**
Leiðarin á Snarskivuni og fyrisitingarstjórin mæla til at pkt. 8 í reglugerðini verður broytt, so tað verður soljóðandi:

*«Tá fólk, sum ikki hava bústað í Tórshavnar kommunu fáa tillutað fasta ogn við lutakasti, verður í fyrsti atløgu gjørd skriftlig avtala við umsøkjaran um, at ognin verður løgd til síðis í eitt ár til umsøkjaran. Er umsøkjarin ikki fluttur í kommununa innan eitt ár eftir lutakastið, verður ognin lutað øðrum umsøkjara. Rindað verður á sama hátt, sum aðrir umsøkjarar, sum hava bústað í kommununi.*

**Fíggjarnevndin 16. mai 2017:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal og Bergun Kass, taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við tilmælinum við teirri broyting, at í mesta lagi 20% av bústøðunum í einari útstykking kunnu tillutast fólki, ið ikki hava fastan bústað í Tórshavnar kommunu.

**Býráðsfundur 23. mai 2017:** Samtykt við 7 atkvøðum fyri og 6 ímóti at taka undir við meirilutanum í fíggjarnevndini.

Fyri atkvøddu:
Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass

Ímóti atkvøddu:
Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen

# 148/17 Fíggjarætlan 2017

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 166/16 | 16/01873-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 25.05.2016 | 153/16 | 16/01873-1 |
| 3 Trivnaðarnevndin | 30.05.2016 | 33/16 | 16/01873-1 |
| 4 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 01.06.2016 | 42/16 | 16/01873-1 |
| 5 Tekniska nevnd | 01.06.2016 | 68/16 | 16/01873-1 |
| 6 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 07.06.2016 | 45/16 | 16/01873-1 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.06.2016 | 167/16 | 16/01873-1 |
| 8 Mentamálanevndin | 15.06.2016 | 171/16 | 16/01873-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 07.09.2016 | 300/16 | 16/01873-1 |
| 10 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 238/16 | 16/01873-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 09.09.2016 | 306/16 | 16/01873-1 |
| 12 Trivnaðarnevndin | 26.09.2016 | 42/16 | 16/01873-1 |
| 13 Byggi- og býarskipanarnevndin | 30.09.2016 | 222/16 | 16/01873-1 |
| 14 Vinnunevndin | 03.10.2016 | 35/16 | 16/01873-1 |
| 15 Tekniska nevnd | 11.10.2016 | 91/16 | 16/01873-1 |
| 16 Tilbúgvingarnevndin | 06.10.2016 | 1/16 | 16/01873-1 |
| 17 Mentamálanevndin | 05.10.2016 | 240/16 | 16/01873-1 |
| 18 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 06.10.2016 | 54/16 | 16/01873-1 |
| 19 Fíggjarnevndin | 19.10.2016 | 308/16 | 16/01873-1 |
| 20 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 284/16 | 16/01873-1 |
| 21 Trivnaðarnevndin | 17.10.2016 | 49/16 | 16/01873-1 |
| 22 Mentamálanevndin | 17.10.2016 | 260/16 | 16/01873-1 |
| 23 Fíggjarnevndin | 25.10.2016 | 363/16 | 16/01873-1 |
| 24 Fíggjarnevndin | 14.11.2016 | 366/16 | 16/01873-1 |
| 25 Býráðsfundur | 16.11.2016 | 290/16 | 16/01873-1 |
| 26 Býráðsfundur | 30.11.2016 | 318/16 | 16/01873-1 |
| 27 Fíggjarnevndin | 29.11.2016 | 399/16 | 16/01873-1 |
| 28 Fíggjarnevndin | 18.01.2017 | 12/17 | 16/01873-1 |
| 29 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 89/17 | 16/01873-1 |
| 30 Býráðsfundur | 26.01.2017 | 57/17 | 16/01873-1 |
| 31 Fíggjarnevndin | 19.04.2017 | 99/17 | 16/01873-1 |
| 32 Býráðsfundur | 27.04.2017 | 131/17 | 16/01873-1 |
| 33 Býráðsfundur | 23.05.2017 | 148/17 | 16/01873-1 |

**Málslýsing:**
Uppskot á greinastøði til fíggjarætlanina 2017 verður lagt fram.

**Tilmæli:**

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Samtykt at taka undir við uppskotinum.

**Ískoyti:**
Við støði í samtykt fíggjarnevndarinnar 11. mai 2016 og samtyktu tíðarætlanini í máli 16/01224 - FÆ 2017 – tíðarætlan skulu faknevndirnar viðgera uppskot til rakstrar- og íløguætlan fyri 2017. Málið verður lagt fyri mentamálanevndina at umrøða og kemur til aðru umrøðu á fundi í juni. Í samtyktini hjá fíggjarnevndini er lagt upp til, at grein 4 og 5 fáa eina framskriving á 1,8%. Hetta svarar til áleið lønarhækkingar í 2017, sum eru uml. 1,9%.
Hjálagt (skjølini koma á nevndarportalin mánadagin) er yvirlitsskjal (skjal 1) fyri grein 4 (fólkaskúlaøkið) og grein 5 (mentanar- og ítróttaøkið), umframt viðmerkingar til einstøku konturnar, ið greina týðandi viðurskifti í sambandi við uppskotið, umframt nærri frágreiðing um møguligar upp- og niðurraðfestingar hjá nevndini at umrøða og meta um.

Á nevndarfundinum fara trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin at gjøgnumganga uppskotið til fíggjarætlan fyri ymisku konturnar. Uppskotini eru m.a. gjørd við støði í fíggjarætlan fyri 2016, mál- og avriksavtalum fyri grein 5 stovnarnar, dialogfundum við leiðslurnar vm. Talan er um stovnar vm. við ymiskum virksemi og ymiskum stevnumiðjum. Í sambandi við fíggjarætlan er týdningarmikið at gera sær greitt, hvussu mett verður um, í hvønn mun stovnar náa settum stevnumiðjum og hvussu til ber at menna indikatorar fyri tað og í øðrum lagi, hvat krevst fyri at gera tað enn betri innan bæði tænastu og rakstur og innan hvønn tíðarkarm!

Umsitingin fer síðani við støði í viðgerðini og viðmerkingunum hjá nevndini á fundinum at gera enn eitt dagført uppskot til nevndarviðgerð í juni. Hareftir verða uppskotini løgd inn í samlaðu fíggjarætlanina, ið aftur kemur til nevndarviðgerð í heyst áðrenn endaligu viðgerðina í býráðnum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til:
a). at umrøða uppskotið til fíggjarætlan fyri einstøku konturnar hjá stovnum og øðrum virksemi og
b). at umrøða verandi ella nýggj stevnumið fyri einstøku økini innan rakstur og íløgur,
c). at umrøða møguligar umraðfestingar innan karmin fyri einstøku greinarnar og hvussu hesar kundu verið framdar.

**Mentamálanevndin 25. mai 2016:** Umrøtt.

**Trivnaðarnevndin 30. mai 2016:** Umrøtt.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 01. juni 2016:** Útsett.

**Tekniska nevnd 01. juni 2016:** Umrøtt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. juni 2016:** Umrøtt.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 07. juni 2016:** Umrøtt.

**Ískoyti**
Hjálagt sum fylgiskjal í nevndarportalinum er frágreiðing viðv. grein 3 – Børn og ung. Á fundinum verður framløga um viðurskiftini sum har eru umrødd.

Innan grein 4 og 5 er gjørd nýggj uppseting og dagføring av skjølunum (sí fylgiskjal "Fíggjarætlan grein 4 og 5" og fylgiskjal "Viðmerkingar til einstøku høvuðskonturnar fíggjarætlan 2017" á nevndarportalinum. Á fundinum verður framløga um útvald viðurskifti í skjalinum og annars framhald av viðgerðini og tilmælinum frá fundinum 25. mai 2016.

**Mentamálanevndin 15. juni 2016:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Fíggjarnevndin skal fyri 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri kommunustýrið. Kommunustýrið skal viðgera uppskot til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarætlanin skal verða endaliga samtykt í seinasta lagi 1. Desember 2016.
Tilfar kemur áðrenn fundin.

**Fíggjarnevndin 07. september 2016:** Útsett.

**Ískoyti:**
Arbeitt er við uppskotinum til fíggjarætlan 2017 at leggja fyri fíggjarnevndina. Fortreytirnar fyri uppskotinum er, at skattaprosenti verður verandi á sama støði. Skattaprosentið lækkaði frá 20,25% til 19,75% í 2016. Barnafrádrátturin verður framhaldandi 8.000 kr. Hædd er tikið fyri lønarvøkstri og virksemisbroytingum annars. Í talvuni niðanfyri eru høvuðstølini býtt upp á greinar, tølini eru undantikið Tórshavnar Havn.

**Uppskot á greinastøði 2017**

| | Roknskapur 2015 | Ætlan 2016 | Reg. ætlan juli | Ætlan 2017 | Broyting pct. FÆ16 -FÆ17 | Broyting kr. FÆ16 - FÆ17 | Broyting pct. RFÆ16 -FÆ17 | Broyting kr. RFÆ16 - FÆ17 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Inntøkur** | | | | | | | | |
| Kommunuskattur | 705.075 | 679.818 | 679.818 | 717.766 | 5,6% | 37.948 | 5,6% | 37.948 |
| Felagsskattur | 30.438 | 20.000 | 20.000 | 20.000 | 0,0% | 0 | 0,0% | 0 |
| Húsaleiguskattur | 1.680 | 2.000 | 2.000 | 2.000 | 0,0% | 0 | 0,0% | 0 |
| Skattur av eftirlønarinngjøldum | 101.653 | 106.122 | 106.122 | 106.122 | 0,0% | 0 | 0,0% | 0 |
| DIS, FAS, og frádráttir | 34.301 | 35.507 | 35.507 | 35.507 | 0,0% | 0 | 0,0% | 0 |
| Tíðaravmarkað flyting til eldraøkið | 8.916 | 4.866 | 4.866 | 0 | -100,0% | -4.866 | -100,0% | -4.866 |
| **Inntøkur tilsamans** | **882.063** | **848.313** | **848.313** | **881.395** | 3,9% | **33.082** | 3,9% | **33.082** |
| | | | | | | | | |
| **Rakstur** | | | | | | | | |
| §1 Kommunal fyrisiting | 76.781 | 78.519 | 79.831 | 79.466 | 1,2% | 947 | -0,5% | -365 |
| §2 Almanna- og heilsumál | 202.275 | 194.192 | 206.021 | 214.177 | 10,3% | 19.985 | 4,0% | 8.156 |
| §3 Børn og ung | 139.802 | 150.338 | 150.415 | 156.590 | 4,2% | 6.252 | 4,1% | 6.175 |
| §4 Undirvísing | 38.641 | 39.096 | 41.200 | 41.310 | 5,7% | 2.214 | 0,3% | 110 |
| §5 Mentan og frítíð | 44.933 | 46.197 | 44.087 | 47.944 | 3,8% | 1.747 | 8,7% | 3.857 |
| §6 Teknisk mál | 115.934 | 111.770 | 119.545 | 112.732 | 0,9% | 962 | -5,7% | -6.813 |
| §7 Kommunal virkir | 54.770 | 56.754 | 61.529 | 59.135 | 4,2% | 2.381 | -3,9% | -2.394 |
| **Rakstur tilsamans** | **673.136** | **676.866** | **702.628** | **711.354** | 5,1% | **34.488** | 1,2% | **8.726** |
| | | | | | | | | |
| **Aðrar útreiðslur** | | | | | | | | |
| Stuðul til rentuútreiðslur | 18.245 | 21.000 | 21.000 | 20.000 | -4,8% | -1.000 | -4,8% | -1.000 |
| Aðrar útreiðslur | 2.295 | 2.000 | 2.185 | 2.029 | 1,5% | 29 | -7,1% | -156 |
| **Aðrar útreiðslur tilsamans** | **20.540** | **23.000** | **23.185** | **22.029** | **-4,2%** | **-971** | **-5,0%** | **-1.156** |
| | | | | | | | | |
| **Úrslit áðrenn rentur** | **188.387** | **148.447** | **122.500** | **148.012** | **-0,3%** | **-435** | **21%** | **25.512** |
| | | | | | | | | |
| **Rentur** | | | | | | | | |
| Rentuútreiðslur | 5.583 | 8.869 | 8.869 | 8.800 | -0,8% | -69 | -0,8% | -69 |
| Rentuinntøkur | 123 | 300 | 300 | 100 | -66,7% | -200 | -66,7% | -200 |
| **Rentu útreiðslur tilsamans** | **5.461** | **8.569** | **8.569** | **8.700** | **1,5%** | **131** | **1,5%** | **131** |
| | | | | | | | | |
| **Úrslit av rakstri** | **182.926** | **139.878** | **113.931** | **139.312** | **0%** | **-566** | **22%** | **25.381** |

Samlaðu inntøkurnar vaksa við 3,9% frá 848 mió. kr. til 881 mió. kr. ella 33 mió. kr. inntøkurnar frá kommunuskatturin hækka 5,6% í mun til fíggjarætlan 2016. Í mun til framrokning frá TAKS 31.08.2016 er løgd ein hækking inn á 2%.

Í uppskotinum til fíggjarætlan 2017 hækka rakstrarútreiðslurnar 5,1% frá 677 til 711 mió. kr. Í mun til reguleraða fíggjarætlan 2016 er broytingin 1,2%. Hædd er tikið fyri lønarhækkan, sum stendur fyri einum munandi parti av vøkstrinum í 2017. Størsta hækkingin annars er innan Almanna- og heilsumál. Játtanin er ætlað heilsu- og umsorganartænastuni. Játtanin á barnaansingar- og undirvísingarøkinum fylgir barnatalinum, sum væntandi er hægri í 2017. Eisini er tikið hædd fyri, at samtykt var at broyta sysktinaavslátturin í 2016. Hækkingin fyri kommunal virkir skyldast í størstan mun sáttmálabundnum broytingum.

Við hesum fyritreytum er úrslit áðrenn íløgur og avdráttir góðar 139 mió. kr. fyri Tórshavnar kommunu í 2017.

Uppskot til fíggjarætlan fyri Tórshavnar Havn er løgd fyri vinnunevndina. Sambart uppskotinum verða samlaðu rakstrarútreiðslur 27,9 mió. kr. og samlaðu inntøkur 59,6 mió. kr. Nettoútreiðslujáttanin verður 31,6 mió. kr. Íløgujáttanin fyri 2017 er 160 mió. kr.

Sambart kommunstýrislógini § 39 skal fíggjarnevndin fyri 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri kommunustýrið.

**Fíggjarnevndin 09. september 2016:** Samtykt at leggja fyriliggjandi uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Framlagt.

**Trivnaðarnevndin 26. september 2016:** Framlagt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. september 2016:** Nevndin staðfestir, at tørvur er á at hækka játtanina til viðlíkahald av bygningum.

**Ískoyti:**
Á fundinum koma trivnaðarstjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini og mentamálaleiðarin at greiða frá høvuðsspurningum innan grein 3, 4 og 5.

**Vinnunevndin 03. oktober 2016:** Framlagt.

**Mentamálanevndin 05. oktober 2016:** Umrøtt.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 06. oktober 2016:** Nevndin staðfestir, at tørvur er á at hækka játtanina til kloakkir, renovasjón og tyrving umframt at hækka konto 6610 Umhvørvistiltøk o.a. í sambandi við umhvørvispolitikkin.

**Tilbúgvingarnevndin 06. oktober 2016:** Mælir til at játta kr. 880.000,00 til viðlíkahald av bygningum í Nólsoy og Tórshavn. Samtykt at sløkkiliðið ger uppskot til skipan av skorsteinsreinsan í kommununu.

**Tekniska nevnd 11. oktober 2016:** Nevndin staðfestir, at tørvur er á at hækka játtanina til kloakkir, avleiddar íløgur í vegakervið í sambandi við Innkomuvegin, íløgur í vegakervið í vestari parti av býnum í sambandi við Glasir, viðlíkahald av øðrum vegum, íløgur í útbygging av samferðslukervi til súkklubreytir og aðrar tekniskar veitingar hjá kommununi. Víðari vísur nevndin á týdningin av at halda fram við gongdini um orkusparandi tiltøk innan bæði vatn og gøtuljós fyri at tálma framtíðar útreiðslunum.

**Trivnaðarnevndin 17. oktober 2016:** Nevndin vísir til skjal nr. 19 í málinum og mælir til at raðfesta játtan kr. 5,5 mió til fleiri tænastur og tilboð til heilsu- og umsorganartænastuna. Nevndin vísir eisini á skjal nr. 7 í málinum og mælir til, at Lopfjølin heldur fram og játta verða kr. 450.000 til endamálið.

**Mentamálanevndin 17. oktober 2016:** Nevndin mælir til at uppraðfesta dagstovnaøkið við 3-4 mió kr. eitt nú til serstakan fíggjarleist fyri smæstu stovnarnar, smærri bygningstillagingar konta 3214, fyribyrgjandi verkætlan (TÍT), og betra ungdómsklubbavirksemið.

**Ískoyti:**
Viðvíkjandi inntøkum hevur TK fingið dagførd tøl síðani seinasta fund. Uppskot til broytingar sambært dagførdum tølum (sí talvu niðanfyri) er ein framskriving av Kommunuskattinum við 2% í mun til seinastu meting, sum er komin frá TAKS. Grundað á, at gongdin í felagsskattinum seinastu árini hevur verið hækkandi, er ráðiligt at hækka felagsskattin við 2 mió. kr. Afturbering í samband við eldraøkið er sambært tølum frá FMR. Viðvíkjandi rentuútreiðslum, er hædd tikið fyri verandi lánum, 50 mió. kr., sum áður samtyktar og, at helvtin av íløguni í skúlanum av Fløtum verður láni fíggjaður. Harumframt er hædd tikin fyri verandi lága rentustøði.

| | Uppskot | Dagførd meting | Broyting |
|---|---|---|---|

| | 2017 | 2017 | |
|---|---|---|---|
| *1.000 kr.*<br><br>Inntøkur | | | |
| Kommunuskattur | 717.766 | 715.962 | -1.804 |
| Felagsskattur | 20.000 | 22.000 | 2.000 |
| Skattur av eftirlønarinngjøldum | 106.122 | 110.967 | 4.845 |
| DIS, FAS, og frádráttir | 35.507 | 34.972 | -535 |
| Inntøkur tilsamans | 879.395 | 883.901 | 4.506 |
| Rentur | | | |
| Rentuútreiðslur | 8.800 | 6.500 | 2.300 |
| | | | |
| Broyting tilsamans | | | 6.806 |

**Tilmæli**
Fyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin mæla til at taka støðu til fyriliggjandi fíggjarætlan og broytingum sambært niðanfyristandandi. Eisini verður mælt til at taka støðu til nevndarviðgerðirnar.

# Yvirlit

## Høvuðsyvirlit

| **Høvuðsyvirlit yvir fíggjarætlan** | | | | **2017** |
|---|---|---|---|---|
| | | **Rakstrarætlan** | | **Løguætlan** |
| Túsund kr. | | Útreiðslur | Inntøkur | Útreiðslur |
| **§ 1.** | **Kommunal fyrisiting** | **79.466** | **-** | **-** |
| | 11. Felagsútreiðslur | 76.567 | - | - |
| | 18. Almenn starvsfólk v.m. | 2.899 | - | - |
| **§ 2.** | **Almanna- og heilsumál** | **214.177** | **-** | **1.500** |
| | 20. Heilsumál | 18.141 | - | - |
| | 21. Almannamál | 196.036 | - | 1.500 |
| **§ 3.** | **Børn og ung** | **156.590** | **-** | **-** |
| | 24. Mentan | 7.772 | - | - |
| | 26. Barnaansing | 148.818 | - | - |
| **§ 4.** | **Undirvísing** | **41.310** | **-** | **80.075** |
| | 23. Útbúgving og gransking | 41.310 | - | 80.075 |
| **§ 5.** | **Mentan og frítíð** | **47.944** | **-** | **22.500** |
| | 23. Útbúgving og gransking | 11.161 | - | - |
| | 24. Mentan | 36.783 | - | 22.500 |
| **§ 6.** | **Teknisk mál** | **112.732** | **-** | **8.000** |
| | 11. Felagsútreiðslur | 50.119 | - | 3.000 |
| | 24. Mentan | 2.917 | - | - |
| | 30. Umhvørvi | 18.201 | - | 5.000 |
| | 38. Samferðsla og samskifti | 41.495 | - | - |
| **§ 7.** | **Kommunal virki** | **27.510** | **-** | **160.000** |
| | 30. Umhvørvi | 19.275 | - | - |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 31. Tilbúgving | 9.394 | - | - |
| 37. Handil og vinna annars | 5.217 | - | - |
| 38. Samferðsla og samskifti | -6.376 | - | 160.000 |
| **Tilsamans** | **679.729** | **-** | **272.075** |
| § 20. 22. Íbúðarmál | 20.000 | - | - |
| § 20. 50. Rentur | 8.700 | - | - |
| § 20. 52. Skattir og avgjøld | 2.030 | 881.395 | - |
| Tilsamans | 710.459 | 881.395 | 272.075 |
| **Yvirskot** | **-** | **170.936** | **-** |
| **Rakstrar-, løgu- og útlánsætlan RLÚ** | **-** | **-101.139** | **-** |
| § 25. 62. Afturgjald av skuld | 17.939 | - | **-** |
| **Bruttokassaúrslit** | **17.939** | **-101.139** | **-119.078** |
| Fígging: | | | |
| § 25. 64. Útvegan av gjaldføri | - | 119.078 | **-** |
| Fígging íalt: | - | 119.078 | 119.078 |
| **Samanlagt** | **17.939** | **17.939** | **-** |

## Broytingaruppskot:

| Tekstur | Deild | | | Broyting |
|---|---|---|---|---|
| ***Fíggjarnevndin:*** | | | | |
| -Avgjald av kapitaleftirlønum, nýggj meting FMR | 20710 | | | 4.845.000 |
| -DIS, FAS og frádráttir, nýggj meting FMR | 20801 | | | -535.000 |
| -Kommunuskattur, nýggj inntøkumeting | 20501 | | | -1.804.000 |
| -Felagsskattur, nýggj meting | 20601 | | | 2.000.000 |
| -Rentuútreiðslur, nýggj meting | 20301 | | | 2.300.000 |
| | | | | |
| **Inntøkur íalt** | | | | **6.806.000** |
| | | | | |
| **Tekstur** | **Deild** | **Rakstur** | **Íløgur** | **Broyting** |
| | | | | |
| ***Trivnaðarnevndin:*** | | | | |
| -Heilsu og umsorganart. Lønarregulering | 2700-2799 | 1.232.000 | | 1.232.000 |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| ***Náttúru- og umhvørvisnevndin:*** | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| ***Mentamálanevndin:*** | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| ***Tekniska nevnd:*** | | | | |
| -Brandstøðin, rætting í lønum | 7210 | -369.000 | | -369.0000 |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| **Útreiðslur íalt** | | **869.000** | **0** | **869.000** |
| **Broyting íalt** | | **869.000** | | **5.937.000** |

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2016:** Umrøtt.

**Fíggjarnevndin 25. oktober 2016:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 14. november 2016:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein mæla býráðnum til at taka undir við uppskotinum til fíggjarætlan við niðanfyristandandi broytingum og við teirri viðmerking, at meirinntøkurnar fyri fíggjarárið 2016 skulu játtast til arbeiðið at byggja Skúlan á Fløtum:

| Tekstur | Deild | | | Broyting |
|---|---|---|---|---|
| *Fíggjarnevndin:* | | | | |
| -Avgjald av kapitaleftirlønum, nýggj meting FMR | 20710 | | | 4.845.000 |
| -DIS, FAS og frádráttir, nýggj meting FMR | 20801 | | | 1.717.000 |
| -Kommunuskattur, nýggj inntøkumeting | 20501 | | | 7.287.000 |
| -Felagsskattur, nýggj meting | 20601 | | | 2.000.000 |
| -Rentuútreiðslur, nýggj meting | 20301 | | | 2.300.000 |
| | | | | |
| **Inntøkur íalt** | | | | **18.149.000** |
| | | | | |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>23. mai 2017 | Blað nr.: 45<br>Formansins merki: |

| **Tekstur** | **Deild** | **Rakstur** | **Íløgur** | **Broyting** |
|---|---|---|---|---|
| | | | | |
| -Fyrisiting, lønarregulering | 1110-1313 | 82.000 | | 82.000 |
| | | | | |
| -Heilsu og umsorganart. lønarregulering | 2700-2799 | 2.377.000 | | 2.377.000 |
| -Brandstøðin, rætting í lønum | 7210 | -149.000 | | -149.000 |
| **Útreiðslur íalt** | | **2.310.000** | **0** | **2.310.000** |
| **Broyting íalt** | | **6.748.000** | | **15.839.000** |

| **Deild** | **Tekstur** | **Upphædd** | **Nevnd** |
|---|---|---|---|
| **Rakstur** | | | |
| 6110 | Umsiting av røkt og bygningum | 5.000.000 | Byggi- og býarskipanarnevndin 30.09.16 |
| 6810 | Kloakkir | 4.000.000 | Náttúru- og umhvørvisnevndin 06.10.16 |
| 7110/8111 | Renovatión, tyrving og reinhald | 2.000.000 | Náttúru- og umhvørvisnevndin 06.10.16 |
| 6610 | Umhvørvispolitikkur | 1.000.000 | Náttúru- og umhvørvisnevndin 06.10.16 |
| 7210 | Viðlíkahald av bygningum í Nólsoy og Tórshavn | 500.000 | Tilbúgvingarnevndin 06.10.16 |
| 2721 | Náttarvakt, reingerð og uppraðfestingar | 7.730.000 | Trivnaðarnevndin 17.10.16 |
| 3215 | Endurgjald vegna longri sjúkralegu | 1.000.000 | Mentamánanevndin 17.10.16 |
| 7316 | Hugskotið | 500.000 | |
| 7311 | Ferðavinnan | 500.000 | |
| | Lopfjølin | 450.000 | |
| | Fíggjarligt fríðpláss | -500.000 | |
| | Ansingarøki | 2.800.000 | |
| **Løgur** | | | |
| 8175 | Útreiðslur til innkomuveg | 5.000.000 | Teniska nevnd 11.10.16 |
| | Skjótibreyt | 3.800.000 | |
| | Skúlin á fløtum | -37.799.800 | |
| | **Íalt** | **-4.019.800** | |
| 20501 | Lækka skattin frá 19,75% til 19,00% | 29.231.000 | |
| | **íalt** | **25.211.200** | |
| | Avlop FÆ2017, sambært broytingaruppskoti 14.11.16 | 25.211.200 | |
| | **At fíggja** | **0** | |

Ein minniluti, Jógvan Arge, viðmerkir, at tað er ósiður, at fráfarandi stýri eftir býráðsval ger fíggjarætlan og ásetur skattaprosent v.m., ið bindur nýggja stýrið, og minnilutin tekur støðu til fíggjarætlanina á seinni fundi.

**Býráðsfundur 16. november 2016:** Samtykt við 9 atkvøðum fyri og ongari ímóti at taka undir við meirilutanum í fíggjarnevndini og fer fíggjarætlanin soleiðis samtykt til 2. viðgerð.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen.

Jógvan Arge, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam og Bogi Andreasen greiddu ikki atkvøðu.

**Ískoyti:**
Niðanfyri eru uppskot til broytingar til fíggjarætlaruppskotið sum samtykt omanfyri:

Kontur 2720-2799: Nýggir lønarsáttmálar eru í heyst gjørdir við flestu fakfeløg innan økið, og sum ávirkar fíggjartørvin fyri 2017. Omanfyri er lagt upp fyri lønarregulering fyri fýra tey størstu av fakfeløgunum svarandi til tkr. 2.377. Ein sáttmáli er síðani komin aftrat, svarandi til tkr. 139.

Konta 2722 Tilboð: Inntøkumetingin fyri tilboð er tillagað staðfestu inntøkunum í 2016.

Konta 2731 Gjøld fyri røktartænastur: Inntøkumetingin er nærri tillagað staðfestu inntøkunum í 2016.

Konta 2761 Leiga: Inngingin er nýggjur leigusáttmáli fyri 2017-2018.

| **Broytingar Heilsu- og umsorganartænastan** | Tkr. |
|---|---|
| Lønarregulering konta 2720-2799 | 139 |
| Broytt inntøkumeting konta 2722 Tilboð | -2.000 |
| Broytt inntøkumeting konta 2731 Gjøld fyri røktartænastur | -600 |
| Leigugjald konta 2761 | 266 |
| | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin mælir til at taka undir við nevndu broytingum.

**Fíggjarnevndin 29. november 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. november 2016:** Samtykt við 10 atkvøðum fyri og 3 ímóti við hesum broytingum:

Deild Tekstur Upphædd

Rakstur

| | | |
|---|---|---|
| 3313 | Klubb 188 | 100.000 |
| 3316 | Úthangið | 100.000 |
| | Klubb 160 | 300.000 |
| 5365 | Stuðul til ítrótt | 300.000 |
| 5717 | Ítróttaranlegg | 300.000 |
| 6110 | Umsiting og røkt av bygningum | -1.000.000 |
| 20301 | Rentu útreiðslur | -350.000 |
| 20910 | Aðrar útreiðslur | -29.000 |

Løgur

| | | |
|---|---|---|
| 6275 | Fríðkan av býnum | -2.000.000 |
| 6575 | Kirkjugarðurin við Velbastaðvegin | 2.000.000 |
| 8175 | Gamli Velbastaðvegur (Vinnuøki Vika) | 2.000.000 |
| 8175 | Stórheygg/Gerðisbreyt á Velbastað | 800.000 |
| 8175 | Ervaveg á Velbastað | 800.000 |
| 8175 | Útreiðslur til innkomuveg | -1.000.000 |
| | Íalt | 2.321.000 |

Eisini samtykt at áseta skattaprosenti til 19% og barnafrádráttin til 8.000 kr.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen

Ímóti atkvøddu:
Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal

Viðmerking frá Tjóðveldi
Tjóðveldi atkvøður ímóti fíggjarætlanini 2017, tí skatturin verður lækkaður samstundis sum raksturin hækkar sløk 10%. Hetta fer at elva til størri skuldarbinding við lántøkum, skulu neyðugu ætlaninar fremjast. Víst verður eisini á, at íløguætlanin 2017 samstundis er lækkað nærum 35% niður í 85 mió kr.

**Ískoyti:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass skjóta upp at gera niðanfyristandandi broytingar í íløguætlanini fyri 2017:

| Uppskot til broyting av íløguætlan | | |
|---|---|---|
| | | |
| 5175 | Musikkskúlin | 15.300.000 |
| 2775 | Eldrarøkt | 2.000.000 |
| 4175 | Dagføring skúlar | -2.000.000 |
| 5775 | Ítróttarannlegg - Svimjihøll | -3.500.000 |
| 5775 | Ítróttarannlegg - Skjótibreyt | -3.800.000 |
| 6175 | Umsiting og røkt av fastari ogn (løgur) | -4.000.000 |

| | | |
|---|---|---|
| 8175 | Innkomuvegur | -4.000.000 |

**Fíggjarnevndin 18. januar 2017:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, taka undir við omanfyristandandi broytingum í íløguætlanini fyri 2017 og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við uppskotinum og mælir býráðnum til at halda fast við samtyktu fíggjarætlanina fyri 2017.

**Býráðsfundur 26. januar 2017:** Atkvøtt varð um tilmæli frá Anniku Olsen, Gunnvør Balle, Marin Katrinu Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Boga Andreasen og Bergun Kass um niðanfyristandandi broytingar í íløguætlanini fyri 2017:

| Konta | Heiti | Broyting |
|---|---|---|
| 5175 | Musikkskúlin | 15.300.000 |
| 2775 | Eldrarøkt | 2.000.000 |
| 4175 | Dagføring skúlar | - 2.000.000 |
| 5775 | Ítróttarannlegg – Skjótibreyt | - 3.800.000 |
| 6175 | Umsiting og røkt av fastari ogn (løgur) | - 7.500.000 |
| 8175 | Innkomuvegur | - 4.000.000 |

ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 6 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Annika Olsen, Gunnvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass

Ímóti atkvøddu:
Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen

**Býráðsfundur 02. mars 2017:**Samtykt við 7 atkvøðum fyri og 6 ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurdsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

**Ìskoyti:**
Ein meiriluti, Annika Olsen, Bergun Kass og Marin Katrina Frýdal, skjýtur upp at gera niðanfyristandandi broytingar í fíggjarætlanini fyri 2017.

| Navn | Konto | Upphædd |
|---|---|---|
| Vetrarfriðing | 6275 | 1.000.000 |
| Lendisgøtur | 6275-I62019 | 1.000.000 |

| | | |
|---|---|---|
| Húsaumsitingin – Aulan í Finsens | 6109 | 500.000 |
| Stuðul annars - Sjósavnið | 5366 | 400.000 |
| Golfvøllur | 5775-I57016 | 300.000 |
| Vinnuverkætlanir – MICE | 7311 | 200.000 |
| Fimleikahøll | 5775-I57018 | -300.000 |
| Býarbókasavnið | 5475 | -1.500.000 |
| Aðrar inntøkur | 20910 | -1.600.000 |

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við omanfyristandandi broytingum og beina málið í býráðið.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 27. apríl 2017:** Samtykt við 7 atkvøðum fyri og 5 ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Sjúrður Olsen, Bergun Kass og Gunvør Balle

Ímóti atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen

**Býráðsfundur 23. mai 2017:** Samtykt við 7 atkvøðum fyri og 6 ímóti

Fyri atkvøddu:
Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass

Ímóti atkvøddu:
Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen

# 149/17 Framflytingar roknskaparárið 2016

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 19.04.2017 | 97/17 | 17/01274-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.04.2017 | 132/17 | 17/01274-1 |
| 3 Býráðsfundur | 23.05.2017 | 149/17 | 17/01274-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 23.05.2017 | 131/17 | 17/01274-1 |

**Málslýsing:**
Mannagongdin hjá Tórshavnar kommunu er, at ikki nýttar játtanir verða fluttar til komandi ár. Hesar skulu játtast í býráðnum sum eyka játtan. Í sambandi við at roknskapurin fyri 2016 er gjørdur upp, er gjørt eitt yvirlit yvir rakstrar- og íløgujáttanir at flyta til 2017. Samlaða framflytingin fyri rakstur er 7,6 mió. kr. netto og ikki nýttar íløgujáttanir at flyta fram eru 170,6 mió. kr.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, Fyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin mæla til at játta framflyting 7,6 mió. kr. netto, til rakstur og 170,6 mió.kr. til íløgur.

Vísandi til mál 17/01105, mæla kommunustjórin, fyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin harumframt til at flyta fram 159.396.054 til íløgur 2017 Tórshavnar havn.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og málið verður beint í býráðið at viðgera tvær reisir.
Klik her for at angive tekst.

**Býráðsfundur 27. apríl 2017:** Einmælt samtykt.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Sjúrður Olsen, Bergun Kass, Annfinn Brekkstein, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson, Heðin Mortensen og Gunvør Balle.
**Ískoyti:**
Í sambandi við framflytingar fyri roknskaparárið 2016 verður mælt til broytingar í rakstrarjáttanini.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin mælir til fylgjandi broytingar í framflytingum:

§ 2 barnavernd: at meirnýtsla á kontu 2612 verður fíggjað við minninýtslum á kontu 2613 og 2617, sí yvirlit.

§ 2 heilsu- og umsorganartænasta: at meirnýtslur á kontu 2720, 2721, 2722, 2750 og 2761 verður fíggjað við minninýtslum á kontu 2730 og 2731, sí yvirlit.

§ 3 dagstovnaøkið:

a) konta 3141 skal leggjast niður, tí stovnurin er ikki til longur, og kann avlop flytast til kontu 3214, sí yvirlit.
b) Minninýtsla av kontu 3144 flytast til kontu 4125, sí yvirlit – talan er um játtan til samlaða virksemið hjá fryskúlanum Lítliskúli.

Flytast av :

| Deild | Navn | Upphædd |
|---|---|---|
| 2613 | Børn sett heiman í fosturfamilju | 200.000 |
| 2617 | Brúkaragjøld serstovnar | 300.000 |
| 2730 | Fyrisiting H&U | 1.623.078 |
| 2731 | Gjøld fyri røktartænastur | 2.893.009 |
| 3141 | Barnagarðurin Vípan (er niðurlagdur) | 86.920 |
| 3144 | Frítíðarskúli til Lítlaskúla | 114.644 |
| | **Tilsamans** | **5.217.651** |

Flytast á :

| Deild | Navn | Upphædd |
|---|---|---|
| 2612 | Barnavernd | 500.000 |
| 2720 | Heilsuhúsið | 1.980.885 |
| 2721 | Røktartænastur | 415.321 |
| 2722 | Tilboð | 1.987.184 |
| 2750 | Ansingarsamsýning | 36.219 |
| 2761 | Leiga | 96.478 |
| 3214 | Broytingar og minni umvælingar | 86.920 |
| 4125 | Fryskúlin Lítliskúli | 114.644 |
| | **Tilsamans** | **5.217.651** |

**Fíggjarnevndin 23. mai 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mai 2017:** Einmælt samtykt.

# 150/17 Roknskaparreglugerð hjá Tórshavnar kommunu 2017

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 16.05.2017 | 122/17 | 17/01599-1 |
| 2 Býráðsfundur | 23.05.2017 | 150/17 | 17/01599-1 |

**Málslýsing:**
Sambært kunngerð nr. 89 um roknskaparverk kommunanna o.tíl. kap. 3 § 4 stk 2 og 3 áliggur tað fíggjarnevndini at gera og dagføra eina roknskaparreglugerð, sum ásetur, hvussu roknskaparhaldið í kommunalu eindunum er fyriskipað. Ansað skal verða eftir, at roknskaparreglugerðin við ábyrgdar- og heimildarreglum verður hildin. Landstýrismaðurin í fíggjarmálum ger eina vegleiðing um, hvussu slíkar reglur skulu verða gjørdar.
Rundskriv um roknskaparreglugerð varð sent út frá landsstýrismanninum í fíggjarmálum, sum kom í gildi 6 februar 2001. Uppskot til Roknskaparreglugerðin hjá Tórshavnar Kommunu fylgir vegleiðingini í hesum rundskrivi.
Fíggjarnevndin hevur skipað roknskaparøkið forsvarliga, tá ið roknskaparreglugerðin er gjørd og góðkend, og tá ið eftirlit er við, at ásettu mannagongdirnar verða hildnar.
Kommunustýrið skal góðkenna roknskaparreglugerðina, og møguligar seinni munandi broytingar/tillagingar, sambært Kunngerð um roknskaparverk kommunanna.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, miðfyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin mæla til góðkenna roknskaparreglugerðina og beina málið í býráðið.

**Fíggjarnevndin 16. mai 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mai 2017:** Einmælt samtykt.

# 151/17 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2017

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.02.2017 | 47/17 | 17/00303-1 |
| 2 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 88/17 | 17/00303-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 22.03.2017 | 75/17 | 17/00303-1 |
| 4 Býráðsfundur | 30.03.2017 | 105/17 | 17/00303-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 19.04.2017 | 100/17 | 17/00303-1 |
| 6 Býráðsfundur | 27.04.2017 | 134/17 | 17/00303-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 16.05.2017 | 124/17 | 17/00303-1 |
| 8 Býráðsfundur | 23.05.2017 | 151/17 | 17/00303-1 |

**Málslýsing:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. § 10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið. Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Tilmæli:**

**Fíggjarnevndin 22. februar 2017:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Framlagt og einmælt góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum

**Fíggjarnevndin 22. mars 2017:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 30. mars 2017:** Framlagt og einmælt góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2017:** Framlagt og góðkent.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 27. apríl 2017:** Framlagt og einmælt góðkent.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>23. mai 2017 | Blað nr.: 54<br><br>Formansins merki: |

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Sjúrður Olsen, Bergun Kass, Annfinn Brekkstein, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson, Heðin Mortensen og Gunvør Balle.

**Fíggjarnevndin 16. mai 2017:** Útsett.

**Býráðsfundur 23. mai 2017:** Tikið av skrá.

**<u>FUNDURIN LOKIN KL. 20:45</u>**

**<u>GERÐABÓKIN GÓÐKEND:</u>**

| | | |
|---|---|---|
| Annika Olsen | Helena Dam á Neystabø | Tróndur Sigurðsson |
| Halla Samuelsen | Bogi Andreasen | Annfinn Brekkstein |
| Jákup Dam | Marin Katrina Frýdal | Bjørghild Djurhuus |
| Gunvør Balle | Turið Horn | Bergun Kass |
| | Heðin Mortensen | |